# Pedagogbladið

FØROYA PEDAGOGFELAG
30 ár
vit fagna ymiskleikanum!
02
12



vit fagna ymiskleikanum!

www. pedagogfelag.fo

# Úr innihaldinum


| | |
|---|---|
| Oddagrein | 2 |
| Tíðindi frá felagnum | 4 |
| Aðalfundurin 2012 | 6 |
| Vit fagna ymiskleikanum | 10 |
| Pedagogar á nærum øllum pallum | 11 |
| Fyrstu B.Ed. pedagogarnir | 12 |
| Sig frá | 14 |
| Fátækradømi – ein orsøk til vansorgan hjá børnum | 16 |
| Hetta er og hetta ger NFFS | 17 |
| Námsfrøðingurin skal verða við í granskingini | 18 |
| Aktións- og Upplýsingargrunnurin | 21 |
| Lívsverk millum fólk ið bera brek | 22 |
| Hjálparfólk, upp við høvdinum | 24 |
| Verkgarðurin Spírin | 26 |
| Forskúlaprátið | 30 |
| Leiðarar ynskja annan bygnað | 31 |


# KOLOFON


**ÚTGEVARI:**
Føroya Pedagogfelag, Postboks 318
110 Tórshavn – Tlf. 35 75 76 – Fax 35 75 73
pedagog@pedagogfelag.fo – www. pedagogfelag.fo
**LAGT TIL RÆTTIS:** Sp/f Rit & Ráð
Tel. 22 92 42 – www. ritrad.fo
**UMBRÓTINGING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ:**
Føroyaprent – www.foroyaprent.fo
**ÁBYRGDARBLAÐSTJÓRI:** Maud Wang Hansen
maud@pedagogfelag.fo
**BLAÐIÐ VERÐUR PRENTAÐ** í 2500 eintøkum, kemur út fýra ferðir um árið, og verður sent limunum í Føroya Pedagogfelag ókeypis
**ONNUR ÁHUGAÐI** kunnu gerast haldarar fyri 100 kr. árliga, við at seta seg í samband við felagið.
**LOYVT ER** at endurgeva tilfar úr blaðnum (myndir undantiknar) treytað av at keldan verður upplýst.
**FORSÍÐUMYND** Vaglið, Alan Brockie

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705


# ODDAGREIN



Maud Wang Hansen

## Útbúgving

Pisurnar eru floygdar, og B.Ed. pedagogarnir eru útbúnir. Summarið er komið, hóast vit hava bíðað leingi eftir tí. Veit ikki, um vit nakrantíð fara at halda, at tað kemur, tá tað skal. Tað unga ættarliðið flytur í stóran mun av landinum at nema sær víðari lesnað. Tað eru summi, sum halda at tað er gott, meðan onnur eru ivingarsom, tí tey óttast fyri, um hesi nakrantíð venda heimaftur. Eg ivist ikki í, at tey venda heimaftur, um tey meta, at her er eitt samfelag at venda heimaftur til. Summi, sum áður fóru av landinum at nema sær víðari ella hægri lesnað, kunnu nú nema sær henda lesnað á Fróðskaparsetri Føroya. Tað er at fegnast um, at hesin møguleiki endiliga er komin til okkum. Føroya Pedagogfelag fer ikki at nokta sínum limum at søkja inn á hesar ískoytisútbúgvingar. Vit eru í teirri vón, at arbeiðsgevarin fer at viðgera limanna umsóknir um førleikamenning við vælvild, eins og teir hava gjørt tað frammanundan. Tað hevði verið skeivt av okkum at forða okkara limum í at nema sær hægri lesnað, tí tað má standa einum hvørjum næst at taka hesa avgerð. Tó skilja vit tey mótmæli, sum Føroya Lærarafelag lýsir, tí tað er einki so eyðmýkjandi sum at hava nomið sær hægri lesnað ella at hava førleikament seg og síðani at ásanna, at arbeiðsgevarin roynir allar heimsins undanførslur fyri ikki at skula gjalda nakað fyri at fáa eina betri tænastu og fyri at fáa enn dugnaligari starvsfólk í skipan sína. At leggja dent á førleikamenning og góða tænastu er fyrsta stig til at seta borgaran í miðdepilin. Uttan dugnalig starvsfólk við hollari vitan og viðkomandi útbúgving fært tú snøgt sagt ikki annað enn ansing og tilvildarliga tænastu. Við góðum førleikum og viðkomandi útbúgving fært borgarin veitt eina tænastu, sum er tillagað tí einstaka menniskjanum, um tað er eitt barn á dag- ella samdøgursstovni ella um tað er ein vaksin við skerdum førleika ella við sosialum trupulleikum, so er íløgan í tað vælútbúna starvsfólkið tað besta íløgan, ið samfelagið kann gera.

## Bygnaðarbroytingar

Íløga í góða tænastu stendur í stórari andsøgn við bygnaðarbroytingarnar hjá Nærverki og Almannastovuni. Nú tey royna at marknaðarføra seg við, at borgarin er í miðdeplinum, og at talan er um, at bert ein hurð er at banka uppá, um tað yvirhøvur er neyðugt at banka uppá, tí hurðin stendur altíð opin, og tú verður væl móttikin, tá tú kemur til hesar dyr. Almannaverkið er nýggi stóri stovnurin hjá landinum. Lítið dugi eg at síggja, at hetta gagnar tí einstaka borgaranum, og eg hómi ein ruðuleika innan hesa einu hurð. Um eingin ávís ætlan er fyri, hvørjir førleikar skulu til fyri at røkja hvørja tænastu, ja so er ivasamt, hvat ætlanin er at borgarin skal fáa burturúr, ella um ein kann siga, at borgarin er í miðdeplinum. Eingin hevði sett ein línumann at bøta trol ella ein trolbassa at føra skip, heldur ikki ein sjúkrarøktarfrøðing at gera eina skurðviðgerð ella ein radiograf at seta saman eitt brotið bein. Ivasamt er, um starvsfólk í løtuni vita, hvat teirra leiklutur er, og um tey vita, hvar tey hoyra til og hvørjum tey starvast hjá. Spurningurin er, um nakar finnur runt í hesi yvirvaksnu skipan, og um tað er so lætt at finna hesa einu hurðina inn og út úr skipanini. Bygnaðarbroytingar, sum vera framdar við sparingum sum fremsta mál, eru dømdar at miseydnast. Hóast tað, so er eitt av høvuðsendamálunum við hesum bygnaðarbroytingum stórar sparingar. Tola vit, at hesar bygnaðarbroytingar miseydnast? Eg hugsi um, at vit hava onga aðra skipan til allar teir 14.000 borgararnar, sum dagliga hava tørv á einari góðari tænastu, og vit hava onga aðra skipan til teir hundraðtals borgarar, sum hava sítt heim í hesi skipan, og vit hava eingi onnur arbeiðspláss til tey 1.700 starvsfólkini, sum starvast í hesi somu skipan.

## Leiklutur okkara

Tað kann tykjast, sum um eitt fakfelag altíð er í andstøðu við arbeiðsgevaran. Tó haldi eg ikki, at tað er ella eigur at vera so. Eitt fakfelag skal nevniliga vera her fyri at lofta teimum starvsfólkum, sum koma í klemmu í einari skipan, sum ikki røkkur teimum. Hesin tørvur økist í eini stórari og ógjøgnumskygdari skipan. Arbeiðsgevarin hevur júst somu skyldur sum fakfelagið til at halda teir sáttmálar og tær avtalur, sum eru. Tað er skylda hjá bæði Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum og Fíggjarmálaráðnum at halda tær avtalur, sum partarnir hava undirskrivað. Tað er skylda hjá arbeiðsgevaranum at syrgja fyri, at endamálið við semjuni verur fylgt, og tað stendur til kommunur og landsins stovnar at syrgja fyri, at starvsfólk fáa tey rættindi, tey hava vunnið gjøgnum samráðingarnar. Eg møtti tveimum monnum nú ein dagin. Annar segði: „Tit fingu ikki nógv burtur úr tykkara verkfalli!" – „Jú", segði eg, „vit vunnu rættin til fyrireiking og eftirmeting." Hin segði: „Heima hjá okkum merkja vit munin. Mamma mín fær nú 3 tímar hvørja viku at fyrireika sítt arbeiði í, og hon fær brúkt sína eftirútbúgving og er viðurkend á sínum arbeiðsplássi fyri ta servitan, hon hevur nomið sær."

Øllum limum og lesarum verður við hesum ynskt eitt gott summar :)




# Fá upp til
# 32% í avsláttri

**Betri pensjón tryggjar tær eina munagóða samansparing, sum leggur lunnar undir eina framhaldandi vælferð, tá ið tú fert frá fyri aldur.**

- Vit samanseta pensjón og tryggingar eftir tínum tørvi
- Vit umsita tína pensjón við størsta vinningi fyri eyga
- Umvegis Netpensjón hevur tú fult gjøgnumskygni

**Savnar tú tryggingar og pensjón hjá okkum, kanst tú fáa upp til 32% í avsláttri.**





**Hevur tú spurningar, ella kundi hugsað tær betri frágreiðing, set teg í samband við okkum á 345 700 ella betri@betri.fo**

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Betri pensjón

## NEVND



**Maud Wang Hansen**
forkvinna
maud@pedagogfelag.fo



**Jógvan Philbrow**
næstformaður
jogvan@pedagogfelag.fo



**Elin N. W. Tausen**
skrivari
elin@pedagogfelag.fo



**Jannie Jacobsen**
nevndarlimur
jannie@pedagogfelag.fo



**Guðrun Eysturlíð**
nevndarlimur
gudrun@pedagogfelag.fo

## UMSITING



**Maud Wang Hansen**
Forkvinna
maud@pedagogfelag.fo



**Katrin Poulsen**
Málsviðgeri
katrinp@pedagogfelag.fo



**Bára Sólheim Guttesen**
Málsviðgeri
bara@pedagogfelag.fo



**Anna Dalsgarð**
Bókhaldari
anna@pedagogfelag.fo



## SUMMARFRÍ

Pedagogfelagið ynskir øllum eitt gott summar. Vegna summarfrí er skrivstovan stongd frá 23. juli til 13. august.

Átroðkandi boð kunnu sendast til **pedagog@pedagogfelag.fo**

## Leiðararáðið

### Endamálið er:

- At lýsa støðuna og møguliga tørvin hjá stovnum og leiðarum yvirfyri nevndini.
- At koma við uppskotum um, hvussu nevndin og leiðarar í felag kunnu lyfta økið, bæði fakliga og fyrisitingarliga.

### Arbeiðsuppgávurnar eru:

- At bjóða ráðgeving til leiðarar.
- At savna og samskipa uppskot til nevndina, til dømis til sáttmálasamráðingar, leiðaraprofil og annað.
- At bjóða hjásitara.
- At skipa fyri árliga Landsleiðaradegnum.
- Fyri at vita, hvat rørir seg millum leiðarar, er tað av týdningi, at vit hoyra frá tykkum.

*Tel. nr. 28 75 74*

*Telefonin er opin frá kl. 9.00-16.00 gerandisdagar.*
*Um vit ikki svara, vinaliga send eini sms boð og vit venda aftur til tín.*

*leidarin@pedagogfelag.fo*

**Í leiðararáðnum eru:**
Joan Midjord, Poula Ejdesgaard, Nancy Poulsen Mirjam Johannesen og Hildur Hermansen

# Limafundir runt landið

Síðst í mars hevði nevndin í Føroya pedagogfelag limafundir um alt landið. Endamálið við fundunum var fyrst og fremst at kunna um semjuna og greiða frá hvussu nevndin metti at tíð til fyrireiking og eftirmeting átti at skipast. Tað var tó eisini ein møguleiki hjá nevndini at hitta limir runt um í landinum og takka teimum fyri teirra íkast í júst farna verkfallinum.

Á limafundinum, sum var í Suðuroy varð „Trivnaðarkanningin" frá 2010 eisini løgd fram.

Limafundir vóru hildnir í Norðoyggjum, Vágunum, Eysturoynni, Streymoynni og í Suðuroynni.








BANK**NORDIK**

# Persónlig røkt av tínari pensjón

Nýtt í Føroyum
- og bert hjá
BankNordik

## Nú bjóðar BankNordik Persónliga PensjónsRøkt

Persónlig PensjónsRøkt frá BankNordik er til tín, ið vil økja møguleikan fyri størri avkasti av tínari pensjónsuppsparing.

Okkara serfrøðingar seta tín pening í virðisbrøv og hava støðugt eftirlit við og røkta tínar íløgur. Íløgurnar verða lagaðar eftir tínum persónliga íløguprofili, og við Netbankanum hevur tú altíð yvirlit yvir tína pensjónsuppsparing.

Øll kunnu vera við. Lægsta upphædd fyri at stovna Persónliga PensjónsRøkt er 40.000 krónur.

Tosa við tín ráðgeva í dag um Persónliga PensjónsRøkt.

### 4 fyrimunir við Persónligari PensjónsRøkt

- ☑ Økir møguleikan fyri størri avkasti av tínari pensjónsuppsparing
- ☑ Verður lagað eftir tær og tínum íløguprofili
- ☑ Okkara serfrøðingar hava støðugt eftirlit við og røkta tínar íløgur
- ☑ Tú hevur altíð yvirlit

**www.banknordik.fo**

SENDISTOVAN



# Aðalfundurin 2012

## AÐALFUNDURIN Í ÁR STÓÐ Í LJÓSINUM AV STYRKTUM SAMANHALDI MILLUM LIMIRNAR OG STØRRI FAKLIGARI VIRÐING

Orð: Maud Wang Hansen

344 vóru møtt á fundinum, sum byrjaði við, at Uni Arge, gestarøðari, helt eina framúr góða røðu. Her eru brot úr røðuni, sum eisini kann lesast á www.pedagogfelag.fo

„Bara eitt felag stóð fast við tað, sum tað frá byrjan segði og meinti, og tað var Føroya Pedagogfelag.“

„Boðini vóru greið. Lønin er láturliga lág, og tykkara prinsipp eru skeiv, segði felagið frá byrjan við arbeiðsgevararnar, og tað sama segði felagið, tá tað tók konsekvensin av tí, sum tað hevði sagt, og fór í verkfall. Við hesi avgerð tók Føroya Pedagogfelag á seg at bera kyndilin fyri alla fakfelagsrørsluna í eini tíð, har konsekvensloysi og teknokratiskt snakk eru farin at eyðkenna tey fyrr so eldhugaðu fakfeløgini. Berjist tú ímóti einum mótparti, sum onki virðir teg, kanst tú ikki hopa eftir hæli og kunngera at enda, at tú onki meinti við tínum mótmæli. Tú mást standa fast. Og tað gjørdi Føroya Pedagogfelag, tá fakfelagssamstarvið brotnaði í límingini, og fakfeløg kropp á kroppi gjørdu avtalur, sum ongin var errin av. Og eg kann siga tykkum, at millum fólk stendur størsta virðingin framvegis um eitt felag eftir orrustuna í vetur, og tað felagið er Føroya Pedagogfelag. Ongin hevði væntað, at tað var haðani, at ein nýggj Ingeborg skuldi daga undan kavi, og ongin hevði væntað, at hetta felagið var so væl skipað og kundi skapa so stóra sympati rundan um seg, sum tað gjørdi. Ja, ongin hevði heldur væntað, at hetta felagið, sum traditionelt er eitt felag við hóvligum kvinnum og eisini monnum, fór at seta leiðaranum á lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum stólin fyri hurðina og megafonina fyri oyruni, tá tað kom til skarpskeringar.“

„Tað fyrsta, vit løgdu til merkis, var, at Føroya Pedagogfelag kravdi, at limirnir møttu upp í verkfalstíðini. Har er skil í, hugsaðu vit. Tað næsta, vit sóu, var, at 2.000 hjørtu vórðu sett á Tinghúsvøllin. Tey eru kreativ, hugsaðu vit. Tað triðja, vit upplivdu, var, at eini 1.300 pedagogar møttu upp til mótmælisgongu í Havn. Tey standa saman, hugsaðu vit. Tað fjórða, vit upplivdu, var, at ein herdeild úr Føroya Pedagogfelag fór á flogvøllin at taka ímóti formanninum í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum at leggja trýst á hann. Tey eru humoristisk, hugsaðu vit. Tá hann ikki hevði mandat til








Framhald á síðu 8












Hvør veitir ráðgeving og innbúgv?

Barnahúsið IMBA veit.

SENDISTOVAN

Postboks 109 | 110 Tórshavn | 347 347 | samband@nema.fo | www.nema.fo

nema












nakað sum helst, heysaðu tit so sjóræn-arafløgg upp í flaggstengurnar uttan fyri Fíggjarmálaráðið, blokeraðu inngongdina har og herdu tiltøkini á bústovnunum. Tey eru viljasterk, hugsaðu vit tá. Fyri hvørt átak vaks virðingin millum fólk fyri tykkara felag, tí hugsið tykkum, hvat tit uppnáddu: Tit vístu, at pedagogar eru væl skipaðir, kreativir, humoristiskir, viljasterkir og standa saman.“

Landsstýrisfólkini í almannamálum og mentamálum vóru boðin við á fundin. Annika Olsen luttók, og hevur tað stóran týdning fyri okkum í Pedagogfelagnum at vísa okkara fólkavaldu á týdningin av tí námsfrøðiliga arbeiðinum.

Felagið varð heiðrað við einari gávu frá einum limi; Ingvør í Haraldsstovu hevði gjørt eitt grafiskt listaverk, sum hon ognaði Pedagogfelagnum. Íblásturin varð sprottin úr verkfallinum og sterku kensluni, tað gav henni, tá fleiri onnur fakfeløg lýstu samhugaverkfall við Pedagogfelagið.

Aftan á eitt drúgt verkfall í 22 dagar, er gerandisdagurin við at venda aftur til tað vanliga úti á arbeiðsplássunum og inni í Pedagogfelagnum. Orðaskiftið á aðalfundinum gav eina fatan av, at stríðið hevur styrkt um samanhaldið og fakliga stoltleikan millum limirnar og kring um í øllum samfelagnum.

At fáa staðfest fyrireikingartíðina í sáttmálanum sum ein arbeiðshátt hevur stóran týdning fyri okkum. At arbeiðsgevarin ikki letur pengar fylgja við kravinum, er harafturímóti ein trupulleiki, sum er torførur at hava við at gera. Tá samráðingar hava verið, er tað upp til báðar partar at virða ásetingina í sáttmálanum, og tí heitir Pedagogfelagið á allar arbeiðsgevarar um at syrgja fyri, at orðingin um fyrireikingartíð verður fylgd, og at endamálið við orðingini verður rokkið.

Tað hevur stóran týdning fyri øll, sum starvast á pedagogiskum arbeiðsplássum, at hava so góð arbeiðsviðurskifti sum gjørligt, hetta fyri at veita eina so góða tænastu sum gjørligt. Tað vil arbeiðsgevarin eisini, tí tað er eitt grundleggjandi krav til alla nútímans tænastu, at arbeiðsviðurskiftini eru góð, og at borgarin er nøgdur. Fakligheit og dygd hanga saman. Virðing fyri arbeiðinum er neyðug, og hana vunnu vit eisini undir verkfallinum – eingin ivast í dag í, at limirnir í Føroya Pedagogfelag veita eina dygdargóða tænastu kring alt landið.

Tvey uppskot vóru til lógarbroytingar. Annað uppskotið var um uppstilling til nevndina, har Sigga Óladóttir Joensen skeyt upp, at lógir felagsins ikki eiga at gera mun á, hvør verður valdur í nevnd. Sigga ynskti, at øll, sum hava hug at stilla upp, skulu hava møguleika fyri at verða vald. Í dag er orðingin soleiðis, at minst eitt hjálparfólk og minst ein námsfrøðingur skal vera í nevndini. Uppskotið bleiv ikki samtykt. 158 atkvøður vóru fyri og 137 atkvøður vóru ímóti. Treytin fyri, at uppskotið kundi verða samtykt, er, at 2/3 av atkvøðunum skulu vera fyri.

Jógvan Philbrow legði fram eitt uppskot um at hækka limagjaldið fyri skjótari at fáa pengar í verkfalskassan aftur. Uppskotið varð ikki samtykt, men aðalfundurin tók undir við, at nevndin arbeiðir víðari við málinum.

Samtykt var á aðalfundinum at:
Uppstillarin gongur við til, at aðalfundurin heitir á nevndina um at arbeiða víðari við limagjaldinum og reglugerðini fyri verkfalsgrunnin.

Málið verður tikið upp aftur á næsta aðalfundi.

Formansval og nevndarval var á skránni. Einki mótvalevni var til formanssessin, og tí heldur forkvinnan Maud Wang Hansen fram tey komandi trý árini. Til nevndarvalið vóru tvey, sum stóðu fyri vali, og trý, sum stillaðu upp. Av tí at Jórun Ennistíg, hjálparfólk, ikki tók við afturvali, var Jannie Jacobsen, hjálparfólk, vald í nevndina komandi trý árini, uttan atkvøðugreiðslu. Hini bæði, sum stillaðu upp til nevndina, vóru Poula Eidesgaard, pedagogur, og Jógvan Philbrow, pedagogur. Poula fekk 92 atkvøður, og Jógvan fekk 236 atkvøður og varð sostatt valdur aftur í nevndina komandi trý árini.

## Eykalimir

Sóley Samuelsen, námsfrøðingur, Poula Eidesgaard, námsfrøðingur og Sigrun Ørvarodd, hjálparfólk, stillaðu upp til valið sum eykalimir.

Úrslitið varð, at Poula varð fyrst vald við 230 atkvøðum, síðani Sóley við 200 atkvøðum, og Sigrun varð trið vald við 103 atkvøðum.

Gott orðaskifti var á fundinum, og nógvir limir komu til orðanna. Orðaskiftið kom eisini inn á, hvørt allir limir kenna seg virdar í Pedagogfelagnum, og um felagið rúmar øllum. Ynski er um at býta felagið meira sundur í ein paraplyfelagsskap, soleiðis













at allir bólkar kenna seg betur hoyrdar og meira sjónligar. Fyrsta stig til hetta varð tikið, tá Leiðararáðið var sett á stovn, og hevur leiðararáðið nú verið virkið í nøkur ár. Sostatt er tíðin kanska komin til at skipa fleiri bólkar í felagnum og at skipa felagið soleiðis, at øll kenna seg heima. Tíðin er ikki til at lata sundurlyndið spjaða okkum, heldur eiga vit at standa saman og at standa sterk.

Fundarfólkið avgjørdi at senda út eina yvirlýsing frá aðalfundinum, og vóru tað Sigga Óladóttir Joensen og Maika Samuelsen, sum vóru settar at gera hesa lýsing, sum varð send miðlunum.

## Yvirlýsing viðvíkjandi skatting av eftirlønargjøldum

Leygardagin 14. apríl varð árligi aðalfundurin hjá Føroya Pedagogfelag hildin í Havn. 344 limir limir vóru á aðalfundinum, og til umrøðu var m.a. broytingin av skattingini av eftirlønum.

Føroya Pedagogfelag mótmælti hesari ætlan hjá samgonguni í desember í fjør saman við 33 øðrum fakfeløgunum í Føroyum. Uppskotið bleiv skundað ígjøgnum av samgonguni uttan gjøllari viðgerð, hóast fleiri fyrivarni og viðmerkingar vóru til lógaruppskotið. Aðalfundurin samtykti tí at senda út hesa yvirlýsing.

Aðalfundurin hjá Føroya Pedagogfelag átalar harðliga avgerðina hjá samgonguni í Føroya Løgtingi í sambandi við skatting av eftirlønum soleiðis, at inngjøld verða skattað heldur enn útgjøld sum frammanundan. Somuleiðis mótmælir aðalfundurin, at skattingin er hækkað upp til 40%.

Aðalfundurin vil staðiliga heita á samgonguna um at fáa hetta í rættlag aftur, til tær fyritreytir og tær avtalur, ið vóru gjørdar undir táverandi eftirlønarskipan. Broyttu fortreytirnar eru eitt greitt álitisbrot á alla eftirlønarskipanina, umframt at tað er í andsøgn við pensjónsnýskipanina, sum allir politiskir flokkar hava tikið undir við.

## Føroya Pedagogfelag

Sum vanligt endaði dagurin við eini góðari máltíð um kvøldið, og har setti Heini í Skorini sín dám á fundin við einari røðu, sum setti nógvar tankar í gongd. Her eitt brot úr røðuni, sum eisini kann lesast á www.pedagogfelag.fo

## „Hvat er samfelagssinni?

Samfelagssinni. Eg veit ikki, hvør vísir meiri samfelagssinni í hesum tíðum. Tey, sum krevja betri umstøður til at røkja tað allarmest dýrabara og viðbrekna, sum vit eiga, nevniliga okkara børn. Ella tey, sum sýta fyri hesum, tí tey ikki skilja, at onkuntíð er ein útreiðsla ikki ein útreiðsla, men ein lívsneyðug íløga, sum kemur fleirfaldað aftur. Sum til dømis at brynja okkara børn til lívið. At mótvirka negativum sosialum arvi við at geva øllum ein kjans. Og ikki minst at geva bæði monnum og kvinnum møguleikan at fara á arbeiðsmarknaðin. Uttan tykkum vóru kvinnurnar ongantíð komnar á arbeiðsmarknaðin, og so høvdu vit ongantíð kunnað skapt eitt so ríkt og sterkt vælferðarsamfelag, sum stórir partar av heiminum øvunda okkum. Í sjeytiárunum vóru pedagogar illa lýddir, tí teir vóru sagdir at máa støðið undan móðurleiklutinum í tí føroysku kjarnufamiljuni. Men pedagogar og barnagarðar eru altso ikki uppfunnir til stuttleika. Ein íløga í ein pedagog er ein íløga í javnstøðu, sum hevur tvífaldað tað føroysku arbeiðsmegina. Uttan tykkum var eingin búskaparvøkstur, og so var eingin vælferð, og so var einki modernað samfelag. Tí eru tit eitt dømi um, at sosial og búskaparlig atlit saktans kunnu ganga hond í hond"



Nevndin takkar øllum sum møttu á aðalfundinum fyri ein góðan og gevandi aðalfund og ynskir øllum limum eitt gott summar.

Næsti aðalfundur verður leygardagin hin 16. mars 2013 á Hotel Føroyum.

FØROYA PEDAGOGFELAG 30 ár vit fagna ymiskleikanum!

# „Vit fagna ymiskleikanum“




Tá ið tú møtir einum flokki av børnum og pedagogum teirra á veg til eitthvørt ella bara spákandi ein túr, so mugu tað vera tey fæstu, ið geva sær far um, hvussu fjølbroytt og ymiskt arbeiðsøkið hjá pedagogum er.

Málbólkurin hjá pedagogum er:

- Menniskju í øllum aldri úr vøggu í grøv
- Alt lívskeiðið ella partar av lívsskeiðinum (barnagarðar, frítíðarskúlar, bústovnar, verkstøð, o.s.fr.)
- Menniskju á øllum støði, børn og vaksin – frá vælvirkandi børnum og vaksnum til børn og vaksin við trupulleikum av atferð, menningarórógvi, tarni ella øðrum.
- Menniskju á veg inn í samfelagið – uppaling av smábørnum, menniskju á leið út úr samfelagnum – marginaliserað og útstoytt
- Menniskju í stríð við samfelagið – byrjandi kriminalitetur og útagerandi
- Menniskju, ið ikki hava fingið grundleggjandi tryggleikan – umsorganarsvikin

Hetta fjølbroytnið og ymiskleikin í avbjóðingunum í gerandisdegnum hjá pedagogum sæst eisini aftur á øllum teimum økjum, teir arbeiða, m.a. vøggustovur, barnagarðar, frítíðarskúlar, forskúlar, skúlar, ungdómar (Margarinfrabrikkin, Húsið, o.s.fr.), dagrøktin, Sernám, Landssjúkrahúsið/Barnadeild, almannaverk, stuðlar, sum arbeiða bæði í skúlum og við børnum og ungum og vaksnum, ið tørvar stuðul annaðhvørt í heiminum ella í dagtilboðum, bústovnar, verkstøð, samdøgurs- og viðgerðarstovnar fyri børn, ung og vaksin, kvinnuheim, frítíðarskipanir til børn og ung, eldraøkið. Umframt alt hetta er vanligt, at pedagogar eru við í leiðslu og samskipan á sosiala og pedagogiska økinum og til at seta í gongd sosial og pedagogisk prosjekt.

Tann, ið skal arbeiða við einum so breiðum málbólki, kemur á leið síni at hava ábyrgd av at skula samstarva við nógvar aðrar fakbólkar, m.a. fólkaskúlalærarar, sosialráðgevar, pedagogiskar ráðgevar, psykologar, psykiatarar, sjúkrarøktarfrøðingar, heilsurøktarar o.s.fr. Umframt stovnar, ið hava ábyrgd av børnum, ungum og vaksnum.

Menniskjasýnið hjá pedagoginum er, at øll, ið arbeitt verður við og saman við, verða fatað sum handlandi persónar við vitan, dreymum, hugsanum og meiningum um lívið og framtíðina. Týdningarmikið er, at øll: børn, ung og vaksin, verða tikin við upp á ráð, verða tikin uppí og fáa týðandi royndir við at hava ávirkan á egið lív.

Hetta menniskjasýni og hendan pedagogiska fatan bera í sær, at aðalendamálið í pedagogiskum virksemi hjá pedagogum er:

- At skapa eitt umhvørvi merkt av umsorgan og tryggleika, har ymiskleikin verður virdur
- At taka støði í møguleikum og tilfeinginum – sum besta grundstøðið undir menning
- At stuðla forvitni og ríkidømi av hugskotum og kreativiteti, so, at tann, ið arbeitt verður við, fær hug til lívið og hug at læra
- Í mestan mun at taka tann, ið arbeitt verður við, við í demokratisku gongdirnar og avgerðirnar, so tey læra at taka á seg ábyrgd av felagsskapinum og sær sjálvum – við støði í teirra fortreytum
- Arbeiðsplássið hjá pedagogiskum starvsfólki, uttan mun til, um málbólkurin er børn, ung, vaksin, normaløkið ella sosialpedagogiska økið, skal skapa karmar um eina sera týdningarmikla samfelagsuppgávu, ið ber í sær: uppaling, dannilsi, menning, lívsførleika og sosialisering, meining við lívinum.

Pedagogurin skal evna at menna eitt pedagogiskt rúm, ið er eyðkent av: professionaliteti, áhuga, engagementi, læring, stuðli, vegleiðing, tryggleika og umsorgan. Eitt rúm, har tað ber til at gera sær jaligar royndir við lívinum.

Alt hetta hevur við sær, at týdningarmikið er at hava vælútbúnar pedagogar til øll hesu ymiskligu fakøkini, pedagogar við eini hollari pedagogiskari vitan og fatan, og starvsfólk við hjartanum á rætta stað.

# Pedagogar
## á nærum øllum pallum








Myndir: Tórfinn Smith

Eitt fakfelag, sum er 30 ára gamalt, er ikki nakað gamalt fakfelag, men hugsa vit um, hvussu nógv Føroya Pedagogfelag hevur ment seg hesi 30 árini, so er talan um eitt fakfelag, sum eftir stuttari tíð er vaksið til størsta fakfelagið á almenna sáttmálaøkinum í Føroyum.

Felagið hevur eina áhugaverda søgu, og komu brot úr søgu okkara út í bók fyri 5 árum síðani. Bókin „Hygg, pedagogarnir koma" varð givin út í sambandi við 25 ára haldið. Í dag ivast eingin í, at pedagogar arbeiða á nærum øllum pallum í føroyska samfelagnum, og tað er stórur tørvur á okkara fakliga kunnleika og førleika, bæði tá tað ræður um arbeiði við børnum, ungum og vaksnum. Ja, vit virka á økinum frá vøggu til grøv. Vit fylgja menniskjuni frá árla á morgni til seint á kvøldi og eisini á myrku nátt.

Eg minnist aftur á løturnar aftan á aðalfundin hjá Pedagogfelagnum, tá limirnir vitjaðu felagshølini í Tungugøtu 1, og har bleiv sungið og spælt og kjakast um alt, sum hevði týdning í lívinum. Vit hingu út gjøgnum vindeyguni og royktu og flentu, og pláss var fyri okkum øllum í húsinum. Søgur sum „Minnist tú tá......" og „hina ferð heima hjá mær, tá vit avgjørdu at...." og søgurnar eru óteljandi, og tær eru sera áhugaverdar og stuttligar.

Nú hava vit hundraðtals arbeiðspláss kring alt landið, bæði hjá landi og kommunum, og eingin vildi longur verið hesi arbeiðspláss fyri uttan. Nú eru limir okkara stoltir av at fortelja, at tey arbeiða á okkara sáttmálaøki, og limirnir eru stoltir av at fortelja, at tey hava nomið sær eina útbúgving sum námsfrøðingur. Mong hava eisini nomið sær hægri útbúgvingar, og tað gagnar føroyska samfelagnum.

Mangan kann tað tykjast torført at seta orð á, hvat tað er, vit arbeiða við, og tað er júst torført, tí tað er so grundleggjandi og so sjálvsagt. Limirnir í Pedagogfelagnum seta síni fingramerki á nærum hvørja familju í landinum, og tey fáa rós fyri sítt góða arbeiði og fyri, at tey á ein professionellan hátt eru við til at skapa karmar fyri menning og vøkstri hjá hvørjum einstøkum samfelagsborgara, lítlum sum stórum, lágum sum høgum.

Føroya Pedagogfelag fer seinni í árinum at seta dám á 30 ára dagin við einum fakfagnaði. Einum fakfagnaði, har føroyskir námsfrøðingar fara at varpa ljós á námsfrøðina og tað týdningarmikla arbeiðið.

Í dag fagna við ymiskleikanum, og vit fagna Føroya Pedagogfelag og øllum limum kring landið.

Hjartaliga til lukku við degnum.

**Maud Wang Hansen**
*Forkvinna*



Fríggjadagin 15. juni var hátíðarløta hildin fyri teimum fyrstu, sum fingu B.Ed. og yrkisrættað prógv sum pedagogar og lærarar. Pedagogblaðið tosaði við nakrar av pedagogunum

Orð: Guðrun Eysturlíð, myndir: Tórfinn Smith



# Margaret Kjelnæs

Margaret Kjelnæs úr Havn flutti til Sandavágs við familjuni fyri tveimum árum síðani. Hon hevur fingið arbeiði í vøggustovuni á dagstovninum Sóljugarði. BA-uppgávan hjá Margaret snúði seg um námsfrøði og heilsu – har talan var um mat, og í synopsupróvtøkuni var hon uppi í menning av sosialum førleikum umvegis rørslu og spæl.



# Rakul Dalsgaard

Rakul Dalsgaard í Fámará hevði ikki funnið sær arbeiði, tá ið hon fekk prógvið sum pedagogur. Dreymurin er saman við manninum at byrja eitt uppihaldsstað fyri menniskju við serligum avbjóðingum. BA-uppgávan hjá Rakul var um børn og seksualitet, har evni vórðu viðgjørd so sum, hvat er normalur seksuellur atburður hjá børnum, og hvat er ónormalt, og hvussu og nær eigur man sum fakfólk at blanda seg uppí, og hvussu skipar man ein seksualpolitikk á økinum. Synopsan var um konfliktir á arbeiðsplássinum.





# Angelina J. Poulsen

Angelina J. Poulsen úr Vági hevur fingið arbeiði í Vøggustovuni við Velbastaðvegin. Angelina sær fyri sær, at hon einaferð í framtíðini fer at starvast á serøkinum. Angelina skrivaði BA-uppgávu um bústaðarmøguleikar og lívsvirði hjá fólki við menningartarni, og synopsupróvtøkan snúði seg um námsfrøðiligt arbeiði við børnum, ið hava foreldur við sálarsjúku.



# Elin Katrina Jacobsen

Elin Katrina Jacobsen úr Klaksvík fer at arbeiða í Fjálva, sum er eitt veristað fyri fólk, sum hava eitthvørt sálarórógv. Elin fer at lesa víðari, pedagogiska sosiologi á DPU. Elinsa BA-uppgáva snúði seg um børn og sorg. Sorgætlanir á stovnum vórðu viðgjørdar, t.v.s. hvussu man kann hugsa tann kensluliga partin inn í sorgætlanir í mun til m.a. reaktiónir, atburð, o.a. hjá børnum, sum syrgja. Synopsupróvtøkan var um leiklutin hjá námsfrøðinginum í innskúlingini, um hvussu námsfrøðingar kunnu nýta fakligu førleikar sínar har og vera við til at gera skúlabyrjanina hjá børnum betri. Hetta vísti hon á við m.a. ymiskum námsfrøðiligum virksemi.

## Evnini til synopsupróvtøkuna

– yrkisrættaðu verkætlanina – vóru hesi:

Lívið sum eitt landslag

Námsfrøðiligt arbeiði við børnum, ið hava foreldur við sálarsjúku

Inklusión í barnagarði – í sambandi við børn, ið vísa problem-atferð

Inklusión

Autisma

At skilja sinnisstøður

Estetisk lærutilgongd við menningartarnaðum

Konfliktir á arbeiðsplássinum

Sosialar konstruktiónir í dagstovni

Stovnsmentan og broyting

Hugsan elvir leiðslu – leiðsla elvir hugsan

Toymisarbeiði

Verkætlanarleiðsla

Tvørprofessjonelt samstarv

Leiðsla av toymi- og toymissamstarvi

Rørslur, sansir og náttúran

Innskúling og rørslur

Motivatión og rørsla

Rørslugleði

Rørsla og læring

Menning av sosialum førleikum við rørslu og spæli

Málmenning við rørslu sum amboð

Ov tíðiliga fødd børn

Samskifti

Seinkað málmenning

Transformational Leadership Style at the Early Childhood Institution

Tá málið krevur tilvitaða stimbran

Børn við sálarsjúkum foreldrum

# „...Sig frá...“

## – harðskapur og kynsligur ágangur ER til

Miðjan juni komu tvær bøkur út á forlagnum Sprotanum, sum bæði eru kærkomnar, men sum ein við einum hjartasuffi eisini hevði viljað verið fyri uttan, tí tær snúgva seg um harðskap og kynsligan ágang á børn og ung. Onnur bókin er vaksnamannabók „... sig frá...“, sum við dømum lýsir viðkvæma evnið á fjøltáttaðan hátt og týðiliga skynir millum, hvussu rættarsamfelagið hoyrir og dømir, og hvussu vanliga samfelagið – tú og eg – lurta, virða og lata tey sleppa at siga frá. Hin bókin, Eg eri eg! Mín eg, er samrøðubók ætlað børnum at læra tey at gera vart við seg og sínar kenslur, at geva teimum dirvi at seta mørk og at koma til ein vaksnan við sínum loyndarmálum, um tey hava tað fyri neyðini.

### Harðskapur og kynsligur ágangur í Føroyum

Harðskapur, kynsligur ágangur og brot á barnarættindasáttmálan hjá ST eru sjálvandi eisini til í Føroyum. Og tað eru fólk í Føroyum, ið gera hesa misbrot, men hetta er so óhugnaligt og viðkvæmt, at høgligast er venda deyva oyrað til, seta kikaran fyri blinda eygað og láta sum luft, tí eingin veit í veruleikanum, hvørjar fylgjurnar verða, tá ið hol verður sett á svullin. Hvørjum skulu vit trúgva? Misbrótara ella misbrotna? Skal ein vera í parti við nøkrum? Familjur syndrast, fólk verða pínd inn á sálina, brigsla sær sjálvum og øðrum, bera agg, eru ráðaleys og heilavill. Vit hava hug at døma, ja kanska enntá taka lógina í egnar hendur, men hvat er rætt, og hvør er rætta loysnin? Lættari hevði verið at tagt tað burtur, tí áttu vit ikki orð fyri tí, var tað ikki til í føroyska samfelagnum. Deiligt! Men er tað rætt?

### At kasta ábyrgd og álit frá sær er tað lætta, men er tað tað rætta?

Í bókini verður fleiri ferðir nevnt, at tey, sum hava verið fyri ágangi, mugu sanna, at allir trupulleikar verri enn so verða loystir, eftir at tey umsíðir hava hættað sær at siga onkrum frá tí, sum tey hava upplivað. Eitt er, at vaksna álitisfólkið trýr tí, sum sagt verður, tá ið barnið vendir sær til viðkomandi, men verður farið víðari við málinum, skulu børnini siga søgu sína fleiri ferðir, og kemur tað so langt sum rættarinnar veg, so kunnu tey vænta, at ivi verður sáddur um frágreiðingina, tí soleiðis er rættarskipanin. Óneyðugt er at siga, at hetta fer illa við fólki – bæði tí, sum hevur verið fyri ágangi, men eisini næstringum, vinfólki og kenningum. Eingin ivi er um, at Margrethe W. Aasland heldur tað vera týdningarmikið, at fólk eru, sum hoyra og síggja hesi sakleysu ólukkudýrini, ið hava verið fyri ágangi. Tað er týdningarmikið, at offrini kenna á sær, at tey eiga onkran góðan, sum tey í trúnaði kunnu siga alt við. Ein, sum trýr teimum, stuðlar og í verki vísir á, hvar tey kunnu fáa hjálp, so tey fóta sær og eiga eina framtíð.

Í „... sig frá...“ vísir Margrethe Wiede Aasland á gongdar leiðir, tó at talan als ikki er um lættar loysnir. Men eins og í barnabókini, har bæði børn og vaksin fáa nøkur góð, mennandi amboð at seta orð á alskyns kenslur og ódámlig loyndarmál, fær tann vaksni vónandi nøkur amboð, sum gera, at ein hevur dirvi at lata eygu og oyru upp, tí alneyðugt er, at fólk eru før fyri at geva teimum ans, sum hava verið fyri misbroti. Tað snýr seg um at vísa offrunum, at tey trygt og órædd kunnu siga sína søgu, sama hvør møguligur rættarúrskurður verður.

### Hevur tílíkt tilfar týdning?

Øll hava rætt at verða hoyrd og sædd, men tá er eisini neyðugt, at onnur fólk eru, ið hava førleika at síggja og hoyra tað, sum vanliga verður dult sum mansmorð, tí tað júst er so trupult at seta orð á. Í sambandi við harðskap og kynsligan ágang er skommin eitt, men kenslan av sviki er næstan tað ræðuligasta! Barnið, sum hevur verið fyri ágangi, kennir seg kanska svikið, men í teirri løtu at tað sigur søgu sína, kennir tað eisini, at tað svíkur onkran. Einki barn í verðini eigur uppiborið at standa í slíkari støðu, men eru eingi oyru, ið hoyra, og eingi eygu, ið síggja, so eru útlitini døpur, og misbrótarin, maður ella kona, mamma ella pápi, omma ella abbi, kann halda á og fær heldur ikki hjálp!

### Í fororðunum í bókini sigur Gunnar Stålsett biskupur:

Tað snýr seg um at gera verju um barnsins friðhalgaða mannavirði. Í einum samfelag, sum byggir á kristna og humanistiska mannaáskoðan, átti hetta at verið sjálvsagt. Men so er tíverri ikki. Mannavirði og mannarættindi hjá børnum eiga støðugt at verða viðgjørd í samfelagskjakinum. Tí takka vit fyri hesa bók, sum í ramasta álvara viðger

# Sig frá



## – um harðskap og kynsligan ágang á børn og ung

Bókagreipan, eina vaksnamannabók og ein barnabók, er ætlað vaksnum og børnum. Rithøvundurin greiðir við ítøkiligum dømum frá ágangi og harðskapi á børn og ung, og hvat tað ger við eitt fólk bæði sum barn og vaksið. Barnabókin er í grundini ein samrøðubók til tey vaksnu at koma á tal við børnini í royndini at læra tey sín kropp og sínar kenslur at kenna, soleiðis at tey fáa førleika og dirvi at seta orð á allar kenslur.




*Bøkurnar eru eitt amboð hjá teimum vaksnu, leikum og lærdum, at gera sína skyldu og røkja sína ábyrgd, tá ið tað snýr seg um mannarættindi, ikki minst barnarættindi.*

Í forsølu
fyri báðar:

**198,00**

Vanligur prísur 278,00

SPROTIN


barnsins mannavirði neyvt og veruliga. Kanska fer hon at birta skilagott orðaskifti um batar um barnins óreingiliga rætt. Tað er barnsins likam og sál, ið her ræður um. Tað er stríðið vert. ("...Sig frá...", s. 11) Og í fororðunum í barnabókini, sum Ada Sofie Austegård, fakligur leiðari á Stine Sofie Stiftelse, eigur, verður víst á, hvussu barnalyndið er, og hvussu trupult tað er hjá vaksnum at verja tey, um ein ikki júst setur álit sítt á teir førleikar, sum eru í tí at duga og hava dirvi at seta mørk. Og tað mugu tilkomin fólk læra børnini, so tey hava ein kjans at fóta sær.

Eitt ár eftir, at lítla dóttir mín Stine Sofie, 8 ár, og vinkona hennara Lena, 10 ár, vórðu ógvusliga neyðtiknar og tiknar av lívi í Baneheia í 2000, siti eg á eini trampolin saman við einum 5 ára gomlum smádreingi. Hann spyr meg, hví Stine Sofie fór við teimum báðum monnunum, sum ikki vóru fittir, niðan í skógin. Eg svaraði, at menninir lugu fyri gentunum og søgdu, at tær skuldu síggja nakrar fittar kettlingar, sum máttu flytast til tryggari stað. Smádrongurin sigur so hissini: „Um onkur, eg ikki kenni, spyr meg, um eg vil síggja kettlingar, so sigi eg nei." „So ert tú sera raskur," svari eg. Hann verður í døpurhuga og starir at mær eina løtu, áðrenn hann spyr: „Men um nú onkur spyr, um eg vil síggja eina kanin...?"

Hvat skuldi eg nú svara? Tað er júst hetta, tað snýr seg um, hvussu forða ella fyribyrgja vit, at børn verður lumpað? Henda samrøða segði mær okkurt; eg havi ongantíð gloymt tann vísa spurningin, ið hesin smádrongur setti. (Eg eri eg! Mín eg, s. 7)

## Professionell umsorgarfólk kenna seg ikki altíð so væl brynjað

Rithøvundurin sigur í einum øðrum broti, at tá ið hon var ung og nam sær útbúgving, tá var lítið og einki tosað um hetta evnið, og tað gav at bíta, tá ið hon nøkur ár seinni hevði ampa av eini gentu á dagstovninum. Hon visti ikki akkurát, hvat tað var, ið hon bar ótta um, men alt ruggaði ikki rætt, og hon vendi sær til leiðaran:

Fyri mongum árum síðan var eg í døpurhuga um eina smágentu, ið var 2 ár. Tað var „okkurt „, ið órógvaði meg. Leiðarin í barnagarðinum svaraði mær, at mamman hevði eitt ógvuliga sjáldsamt hársnið, og at eg tí átti at skilja, at gentan av tí sama var heldur sjáldsom; tað var so tað, eg skuldi ikki hugsa meir um tað. Júst tí at mamman hevði eitt so rárt hársnið, kendi eg hana aftur 12 ár seinni, tá ið eg av tilvildum hitti hana. Hon greiddi mær frá, at hon og dóttirin vóru í Oslo og fingu hjálp, tí pápin hevði kynsliga gjørt seg inn á dóttrina frá hon var 0 ár, til hon var 11 ár, og at hann var dømdur fyri tað. Gentan var tá 14 ár og hevði verið skøkja og narkomanur. Eina slíka samrøðu unni eg ongum. Hevði lagnan hjá dóttur og móður verið ein onnur, um eg hevði gjørt okkurt ta ferðina, eg var so ørkymlað, 12 ár frammanundan?

Ert tú stúrin ella ørkymlað/ur, ger so okkurt. Ikki er vist, at barnið ella tann ungi verða kynsliga misnýtt, men hugsa um álvaran og hjálp alt, tú kanst. Og hittir tú hann ella hana aftur 10 – 15 ár seinni, veitst tú, at tú gjørdi tað, tú kundi. Hugsa um álvaran og ivan, sum kanska fara at níva. Ger okkurt, hugsa teg um, vend ongum bakið! Kanska hjálpti tað, tú gjørdi, kanska ikki, kanska versnaði – vit, sum hava við fólk at gera, vit mugu liva í óvissuni. („...Sig frá...", s. 19-20).

Ivaleyst man onkur vera, ið kennir seg aftur í summum frágreiðingum, men bókin dømir ongantíð, heldur verður víst á, hvørjar møguleikar ein hevur at hjálpa og stuðla. Gjørt verður vart við, at øll sum ein hava ábyrgd og skyldu at gera nakað við slíkt mál, men greitt verður frá muninum millum ymsu fráboðanarskyldurnar, ið eru treytaðar av serligum starvi og vanligari borgaraskyldu. Ein skilur eisini á lagnum, at ein ikki skal halda, at hini kunnu taka sær av slíkum máli. Øll – ikki bara tey, sum hava prógv sum umsorganarpersónar (pedagogar, sjúkrasystrar, lærarar o.fl.) – eru umsorganarpersónar, tá ið tað snýr sum harðskap og kynsligan ágang.



Benny Andersen, formaður í SL og
Vagn Michelsen, konsulentur í SL

# Fátækradømi

## – ein orsøk til vansorgan hjá børnum

*Í døgunum 11. og 12. mai 2012 helt Norðurlendski Felagsskapurin fyri Sosialpedagogar, NFFS, fund í Tórshavn. Við støði í Barnarættindasáttmálanum hjá ST viðgjørdu tey avleiðingarnar av, at børn vaksa upp í fátækradømi.*

***Í eini yvirlýsing, sum var skrivað á fundinum, verður tikið soleiðis til:***
*– Børn, sum vaksa upp í fátækt, eru fyri stórum vanbýti og eiga ongan lut í tí, sum má metast at vera vanlig nýtsla og vanlig luttøka í samfelagnum. Tey eru við skerdan lut og eru sosialt avbyrgd.*

Orð og myndir: Snorri Brend

Í Norðurlondum hevur talið á børnum, sum liva í fátækum familjum, verið í stórum vøkstri hesi seinastu árini. Tað vísa tøl úr Noregi, Svøríki og Danmark, eins og nógv bendir á, at fátækradømið millum børn eisini veksur í Grønlandi, Íslandi og Føroyum.

Tað vaksandi fátækradømið rakar serliga børn hjá støkum uppihaldarum, foreldrum við ongari útbúgving, arbeiðsleysum og børn í familjum, sum eru tilflytarar úr londum uttan fyri vesturheimin. Av heimansettum børnum eru lutfalsliga nógv, sum hava livað og liva í fátækadømi. Meginparturin av børnum, sum vaksa upp hjá fosturfamiljum ella á stovni, eru úr heimum, har stórt trot er á materiellum tilfeingi. Familjur, ið ikki hava orku ella hugskot til virksemi, sum ikki kostar pening. Fátækradømi er ein av orsøkunum til vansorgan.

Nógv børn liva í familjum, hvørs fíggjarstøða er so vánalig, at tey ikki kunnu taka lut í einum fjølbroyttum barnalívi við frítíðarvirksemi, sum kann geva teimum upplivingar av at megna avbjóðingar – nakað, sum kundi fyribyrgt nógvum trupulleikum. Tað eru eisini børn í Norðurlondum, sum liva í treytaleysum fátækradømi.

Tað eru børn, sum sjáldan ella ongantíð eru og ferðast, eru útferð, túr, í føðingardag ella hava vinfólk við heim til hús.

Hóast tað sum heild er økt um vælferðina í Norðurlondum, so er barnafátækradømið vaksið. Orsøkirnar til tess eru á mangan hátt tann førdi búskaparpolitikkurin, ið hevur elvt til størri ójavna. At so nógv børn vaksa upp í fátækradømi, stendst eisini av at vælferðarveitingarnar í alsamt størri mun verða lagaðar eftir einstaklingstørvi, og hetta er serliga til frama fyri tær sterku familjurnar.

### Hetta kann bøta um støðuna

Samstundis sum NFFS vísir á umstøðurnar hjá børnum í Føroyum og Norðurlondum, vísir felagsskapurin eisini á tiltøk sum kunnu bøta um støðuna.

Her verður tikið soleiðis til:

*– Tann besti møguleikin hjá foreldrum at tryggja, at børnini ikki skulu vaksa upp í fátækradømi, er at hava og varðveita eitt arbeiði, sum gevur eina hóskandi inntøku.*

Tí eru átøk til tess at økja um talið á arbeiðsplássum avgerandi í stríðnum móti barnafátækradømi. Men vinnufremjandi politikkur munar einki einsamallur. Tað er eisini alneyðugt at hava børnini í huga í sambandi við útjavningarpolitikkin.

Hetta snýr seg m.a. um:

- Góðar almennar skipanir og tænastur
- Ókeypis dagstovnar, skúlar og frítíðarstovur
- Ókeypis frítíðarvirksemi í kommununum
- Betri stuðul til barnafamiljur
- Kommunalar ætlanir fyri uppvøkstri, sum eisini fevna um arbeiði við barnafátækradømi

Tað ræður um at seta ítøkilig og miðvís tiltøk í verk her og nú, umframt eina langtíðarætlan fyri at sleppa undan, at børn vaksa upp í fátækradømi.

– NFFS heldur, at eitt lutfalsligt og eitt treytaleyst fátækramark eigur at verða ásett. Tað hevði gjørt tað møguligt at fylgt við, hvussu stórir trupulleikarnir við barnafátækradømi eru, hvussu tað broytist, og ikki minst at arbeitt miðvíst fyri at sleppa undan barnafátækradømi, sigur NFFS at enda í fundarfrásøgn síni.



*Vinstrumegin Tone Faugli úr Noregi, Kaaliina Skifte úr Grønlandi og Maud Wang Hansen úr Føroyum*



*Vinstrumegin Laufey Gissurardóttir úr Íslandi, Dea Engberg, Mette Grostøl og Kaj Frederiksen, øll úr Danmark*



*Barnafátækradømið finst í øllum londum, eisini Føroyum og hinum Norðurlondum (Mynd: nova.no)*

# Hetta er og hetta ger NFFS

Nordisk Forum For Socialpædagoger er eitt samstarv millum tey norðurlendsku fakfeløgini hjá sosialpedagogum.

Samstarvið snýr seg um at geva hinum lut í egnum royndum og í tí, sum fer fram í limalondunum, tá talan er um búskaparlig, politisk og sosial viðurskifti.

NFFS er eitt forum, har luttakararnir tosa um ta generellu politisku og búskaparligu gongdina í teimum ymisku londunum og greiða frá menningini og nýggjum tiltøkum á tí sosialpolitiska økinum í hvørjum landi sær. Haraftrat verður greitt frá tí sum hendir í hvørjum einstøkum felag, tá talan er um sáttmálasamráðingar og onnur fakpolitisk mál, soleiðis at fakið verður styrkt.

Í NFFS eru sjey limalond:

- Grønland: Perorsaasut Ilinniarsimasut Peqatigiiffiat (P.I.P.)
- Ísland: Þroskaþjálfafélag Íslands
- Finland: Sosiaalipedagogit Talentia ry
- Noreg: Fellesorganisasjonen
- Svøríki: Vision
- Danmark: Socialpædagogernes Landsforbund
- Føroyar: Føroya Pedagogfelag

NFFS-skrivstovan skiftir millum tey fýra stóru londini Danmark, Noreg, Svøríki og Finland.

Hetta er fyrstu ferð, at NFFS heldur stýrisfund sín í Føroyum. Danmark, sum hevur skrivstovuna frá 2011 til 2013, valdi at leggja hendan fundin í Føroyum, eins og tey áður hava lagt onkran fund í Grønlandi.

Grønland og Føroyar eru ikki mett at vera nóg stór til at hava skrivstovuna. Tó hevði Ísland skrivstovuna seinastu tvey árini, og tað gekk væl. Tey fingu hjálp til tað mest neyðuga og megnaðu eisini at skipa fyri einari stórari norðurlendskari ráðstevnu um sosialt arbeiði í Norðurlondum.

DANMARKS PÆDAGOGISKE UNIVERSITETSSKOLE
AARHUS UNIVERSITET

# Námsfrøðingurin skal verða við í granskingini

*Í sambandi við okkara serritgerð í námsfrøðiligari sálarfrøði á Danmarks Pædagogiske Universitetsskole (DPU) viðgjørdu vit millum annað, hvørjar møguleikar og avmarkingar námsfrøðingar hava í sínum starvi í sambandi við at menna ta námsfrøðiligu dygdina á dagstovnaøkinum.*

Tann námsfrøðiliga dygdin verður viðgjørd út frá áskoðanini hjá námsfrøðinginum í Føroyum út frá eini kritiskari sálarfrøði, har námsfrøðingurin er viðgranskari í egnari praksis, og á henda hátt seta vit orð á vitanina hjá námsfrøðinginum um gerandisdagin hjá børnunum. Hetta verður gjørt við eini kvalitativari kanning, har samrøður við námsfrøðingar og eygleiðing verður nýttar.

Námsfrøðingar hava eina stóra vitan um børn, hvat virkar og hvat ið ikki virkar. Eina „stilla vitan“ ella sum Charlotte Højholt, [1]granskari og lektari á RUC, kallar tað: „rygmarvsrutiner“, og er hetta ein vitan, sum granskarar fegnir vilja hava innlit í. Hendan vitanin um felagsskapir, møguleikar og trupuleikar, sum eru við til at mynda dagin hjá barninum, er av alstórum týdningi, tá avgerðir um børn vera tiknar. Námsfrøðingar hava eina størri vitan, enn teir vanliga fáa viðurkenning fyri.

## Námsfrøðilig dygd

Gunni Kärrby (1993) lýsir í „Kvalitet i pædagogisk arbejde med børn“, at dygd verður skoðað ymiskt, treytað av, um man er politikari, námsfrøðingur, foreldur ella barn. Har námsfrøðingurin metir dygd út frá bæði fakligheit og út frá stovninum sum arbeiðspláss í gerandisdegnum, vil ein politikari vanliga leggja dent á virkisføri og fíggjarliga burðardyggar dagstovnar. Barnið vil vera meira upptikið av einum gerandisdegi, merktur av gleði og spenningi, ímeðan foreldur hava fokus á tryggleikan og umsorganina hjá barninum. Í hesi greinini verður námsfrøðilig dygd lýst út frá, hvat námsfrøðingar meta skal til fyri at fremja eina góða / betri námsfrøðiliga dygd á dagstovnaøkinum. Sambært Grethe Kragh-Müller[2] (2010), sum er lektari á Institut for Uddannelse og Pædagogik (DPU), cand. psych. og serfrøðingur í barnasálarfrøði, eru tað nógv viðurskifti, sum ávirka ta námsfrøðiligu dygdina á dagstovnaøkinum, og tí verða m.a. børnini og samfelagsligar umstøður eisini viðgjørd hesum viðvíkjandi.

Áhugin fyri at skriva eina serritgerð um námsfrøðingar á dagstovnaøkinum spretti úr okkara royndum sum námsfrøðingar á hesum øki. Royndir høvdu víst okkum, at hóast lærdóm um fleiri góð ástøði og útlendskar granskingar á hesum øki, so var tað stór avbjóðing at fylgja hesum lærdómi í starvinum. Hetta tí at tað námsfrøðiliga arbeiðið á dagstovnaøkinum er eitt arbeiði við nógvum praktiskum uppgávum, so sum at fyrireika máltíðir, rudda o.s.fr. Samstundis er bólkurin av børnum ofta stórur á dagstovnaøkinum, og tí kann tað hava týdning, at gerandisdagurin verður fyrireikaður, fyri at fakligheitin verður ein partur av gerandisdegnum saman við børnunum.

Fyri at hetta skal bera til, er tað treytað av øðrum viðurskiftum, sum at samstarvið við starvsfelagar er gott, góð normering, minimal sjúka, gott foreldrasamstarv o.s.fr. Tí kundu vit staðfesta út frá okkara royndum sum fyrrverandi námsfrøðingar á dagstovnaøkinum, at tann námsfrøðiliga dygdin í arbeiðinum er bundin at fleiri øðrum viðurskiftum enn bert gerðum og avrikum hjá tí einstaka námsfrøðinginum.

Vit mettu, at tørvur er á kvalitativari gransking út frá áskoðanini hjá námsfrøðingum á hesum øki í Føroyum, og fóru vit tí í gongd við at kanna, hvørjar møguleikar námsfrøðingar hava fyri at menna ta námsfrøðiligu dygdina í sínum arbeiði í Føroyum.

## Tilvitan av arbeiðinum og viðurkenning

Í fjølmiðlunum er rákið ofta, at námsfrøðingar hava eina veika og trilvandi fakligheit (Nørregård-Nielsen 2006)[3]. Kanning, sum Granskingardepilin fyri samfelagsmenning

[1] *http://www.bupl.dk/iwfile/AGMD-7VQHYP/$file/forskningsindstik_1.pdf*

[2] *Perspektiver på kvalitet i daginstitutioner 2010, Grethe Kragh-Müller*

[3] *Ph.d. ritgerð – Pædagoger i skyggen, Esther Nørregård-NielsenSerie:. Forlag: Sociologisk Institut, Københavns Universitet.*

gjørdi fyri Føroya Pedagogfelagið í 2010, vísti, at 61% av starvsfólkunum á dagstovnaøkinum søgdu, at teirra arbeiði í ein lítlan mun til als ikki verður viðurkent av tí politiska myndugleikanum[4]. Her komu vit fram til, at tað skapar møguleikar, at námsfrøðingar eru við til at gera sítt fak meira tilvitað, bæði fyri seg sjálvar og fyri m.a. myndugleikarnar. Gransking og skjalprógving á økinum vildi verið ein háttur at ment praksis, so politikarar fáa innlit í fakligheitina í starvinum hjá námsfrøðingum. Hetta sást týðiliga undir verkfallinum hjá Pedagogfelagnum. Áhugavert var at fylgja tí námsfrøðiliga kjakinum, har námsfrøðingarnir bóru fram sína hugsan og ynski um viðurkenning av sínum faki. Ljós varð varpað á námsfrøðina og námsfrøðingin undir verkfallinum, og er tað so sanniliga tiltrongt. Ikki bert mótvegis politikarum, men Føroyar sum heild vantar vitan og gransking á økinum. Hetta er eisini eitt ynski frá námsfrøðingunum, sum vit gjørdu samrøður við. Men hvør hevur ábyrgdina av, at hetta verður veruleiki?

## Leikluturin hjá hjálparfólkum

Námsfrøðingar hava lyndi til at hugsa meira um at nøkta tørvin hjá foreldrunum og politikarum, heldur enn at vísa seg sum serfrøðingar á sínum øki. Sambært einari ph.d. ritgerð, sum Nørregaard-Nielsen gjørdi í 2006, har hon hevur gjørt samrøður og eygleitt á 7 dagstovnum í Danmark, kemur tað fram, at foreldur og politikarar ikki virðismeta arbeiðið hjá námsfrøðinginum serliga høgt. Eisini vísir kanningin, at námfrøðingar sjálvir ikki virða sítt fak høgt. Hetta sæst millum annað av, at teir eru ivasamir um sín egna førleika og virðisgrundarlag og hava ilt við at avmarka seg frá hjálparfólkunum. Tað, at námsfrøðingar hava ilt við at seta mørk ímillum seg og hjálparfólkini, kann vera ein orsøk til, at tað er torført at sannføra foreldur og politikarar um, at námsfrøðingar eru ein fakbólkur, sum hevur serstaka vitan og virði. Nørregaard-Nielsen leggur upp til, at hjálparfólk vera sædd sum ein praktisk hjálp og ikki námsfrøðilig hjálp. Men ikki bert tann broytingin skal til, men ein kjakmentan, sum skal byrja á útbúgvingarstaðnum. Hesa brøðravirðing ímóti hjálparfólkunum sóu vit eisini í okkara empiri, eitt nú at man m.a. ikki hevði námsfrøðiligar fundir, tí hjálparfólkini vildu vera við á fundunum. Tí er tað av alstórum týdningi, at um tann námsfrøðiliga dygdin skal hækka, so noyðist dentur at vera lagdur á fakligheitina hjá námsfrøðinginum og ikki á at vera javnlíkur við hjálparfólkini. Tí ein kann vera javnmettur uttan at vera javnlíkur.

Sum áður nevnt skal meira kvalitativ gransking til á økinum; hetta kundi økt um viðurkenningina av fakinum, har áskoðanin hjá námsfrøðingum bleiv tikin við. Við tílíkari gransking kundu foreldur og aðrir samfelagsbólkar, sum eru knýttir at økinum, fingið meira vitan um týdningin av arbeiðinum hjá námsfrøðingum. At onnur fingu betri innlit í fakið hjá námsfrøðingum, og námsfrøðingar samstundis møguliga merktu, at fakið bleiv meira viðurkent, kundi havt við sær, at bæði áhugin og tænastustøðið høvdu batnað.

Vegna nevndina í Pedagogfelagnum er ein grein skrivað um, at kommunur raðfesta høgt at spara á dagstovnaøkinum[5]. Við meira gransking og møguleika fyri størri viðurkenning av arbeiðinum hjá námsfrøðingum í Føroyum høvdu politikarar verið betri kunnaðir um týdningin av arbeiðinum, tá avgerðir um at fíggja dagstovnar og krøv um eitt nú at skjalprógva verða viðgjørd.

## Strævið arbeiði

Sambært kanningini hjá Pedagogfelanum arbeiða bert 27 % av námsfrøðingum fulla tíð, harav (svar frá bæði námsfrøðingum og hjálparfólki) siga 47 % tað vera, tí at arbeiðið er so strævið. At arbeiðið kennist strævið, kann ávirka ta námsfrøðiligu dygdina, og tí er tað týdningarmikið at síggja møguleikar fyri, hvussu man sum námsfrøðingur kann ávirka hetta, so arbeiðið kennist minni strævið.

Eitt nú at leggja ætlan fyri arbeiðið kann vera við til at gera arbeiðið minni strævið, soleiðis at tað námsfrøðiliga er hugsað við í gerandisdegnum. Eisini kann eitt fyrireikað arbeiði minka um viðurskifti sum t.d. larm



*Súsan Hvidbro*



*Elinborg S. Petersen*

inni á stovuni, og tað at námsfrøðingar mugu vera „on“ alla tíðina (t.v.s. fyrihalda seg til nógv ymiskt gjøgnum arbeiðsdagin, tí alt er spontant). Men fyri ein part av námsfrøðingunum, sum vóru viðgranskarar í okkara serritgerð, kundi frávera burtur frá starvsfeløgum og børnum til at fyrireika arbeiðið vera merkt av ringari samvitsku. So er spurningurin, hvat skal raðfestast – at leggja arbeiðið til rættis ella spontant arbeiði, har námsfrøðingurin ongantíð fer burturfrá? Hetta koma vit nærri inn á seinni í greinini.

Harumframt bendu útsagnir á, at tá tað snýr seg um, at arbeiðið kennist strævið, so hevur tað týdning, at øll starvsfólk á eini stovu arbeiða sama tal av tímum um vikuna. Tí um bert ein á stovuni arbeiðir fulla tíð, vil hesin námsfrøðingurin uppliva arbeiðið strævnari enn hini, og er hetta eisini við til at ávirka ta námsfrøðiligu dygdina, tí hetta kann ávirka trivnaðin og virkisførið hjá viðkomandi námsfrøðingi.

Gongdin bæði í Føroyum og í Danmark er, at talið á námsfrøðingum, sum arbeiða niðursetta tíð, veksur fyri hvørt ár. Umframt at orsøkin kann vera, at starvsfólk ynskja at arbeiða niðursetta tíð, so kann hetta eisini út frá okkara greining í serritgerðini m.a. vera vegna sparingar og øktar uppgávur á økinum. Tá arbeiðið kennist strævið, kann

[4] *http://setur.fo/fileadmin/user_upload/GFS/PDF-filur/Arbei%C3%B0srit/Arbeidsrit_26-2010.pdf*

[5] *http://www.pedagogfelag.fo/index.php?option=com_content&view=article&id=352:er-politiskur-ahugi-fyri-trivnaeinum-a-dagstovnaokinum&catid=35:tieindi&Itemid=50*

> Í serritgerðini verður komið fram til, at tað hevur stóran týdning at hava fyrireikingartíð til at skipa gerandisdagin

ein avleiðing av hesum vera størri vandi fyri sjúkrameldingum, sum aftur eru við til at tyngja um arbeiðið hjá starvsfólkunum, sum eftir eru á arbeiðsplássinum.

## Politiski myndugleikin – munurin á Danmark og Føroyum

Í Danmark verða dagstovnar nógv meira stýrdir av tí politiska myndugleikunum, har kravt verður, at alt arbeiðið á dagstovnaøkinum skal verða skjalprógvað og góðkent av kommununi. Hetta hevur víst seg at vera ein sera óheppin gongd í tí danska samfelagnum, tí sambært serfrøðingum er tann námsfrøðiliga dygdin versnað, og børnini verða latin alt meira yvir til sín sjálvs. M.a. hava menningarsálarfrøðingurin Dion Sommer, Grethe Kragh-Müller og málserfrøðingurin Martha Sif Karrebæk úttalað seg um, at fleiri dagstovnar hava so ringar umstøður, at tey ikki longur kunnu standa inn fyri at vera eitt mennandi stað fyri børnini. Hetta tí at børn í alt ov stóran mun vera latin til sín sjálvs í dagstovnum, ímeðan alt skal skjalprógvast, og tað gongur út yvir bindindi og málsliga menning hjá børnunum umframt førleikan at vera í sosialum relatiónum[6].

Í bókini „Hygg! Pedagogarnir koma", sum kom út í sambandi við 25 ára dagin hjá Pedagogfelagnum, verður sagt, at námsætlanir eru eitt amboð hjá myndugleikunum at stýra dagstovnaøkinum (Kjølbro 2008:37). Í 2006 kom ein kunngerð í dagstovnalógina, ið leggur upp til, at námsætlanir eiga at verða gjørdar í Føroyum. Tann nýggja kunngerðin áleggur námsfrøðingum fleiri uppgávur, og tað kann hava við sær, at teir eru meira burtur frá børnunum. Tímar til at útinna tær øktu uppgávurnar, ið kunngerðin krevur, fylgja ikki við, og er hetta galdandi bæði í Føroyum og Danmark. Rúgvan av krøvum er kortini munandi størri í Danmark. Grethe Kragh-Müller hevur granskað í, hvussu námsfrøðingar m.a. upplivа hesi politisku herdu krøvini í Danmark, og har kemur tað fram, at námsfrøðingar meta, at tey mál og hugskot, sum eru í lógini, eru góð, men at tær øktu uppgávurnar taka tíð, um ein skal liva upp til krøvini. Av tí, at tíð til at útinna uppgávurnar ikki fylgir við krøvunum, stjelur hetta tíð frá børnunum (Kragh-Müller 2010). Sambært eini kvantitativari kanning arbeiða námsfrøðingar í Danmark 49 % (Udviklingen i daginstitutionernes bemanding 1986-2011) av arbeiðstíðini við slíkum, har teir ikki eru saman við børnunum, og er hetta ikki ein gongd leið eftir okkara tykki.

## Fyrireikingartíð

Teir føroysku námsfrøðingarnir, sum vóru viðgranskarar í okkara serritgerð, vóru sera bilsnir um gongdina í Danmark, og teir vóna ikki, at myndugleikarnir í Føroyum í framtíðini fara at fylgja somu gongd. Tí um fakið verður so nógv stýrt av myndugleikunum, fer minni at verða lurtað eftir tí fakliga førleikanum hjá námsfrøðingum, samstundis sum námsfrøðingar eru minni saman við børnunum. Við hesi gongd er eisini vandi fyri, at tann námsfrøðiliga dygdin vesnar munandi. Rasmus Willig (samfelagsfrøðingur) sigur soleiðis um, hvussu stýrdir námsfrøðingar eru í Danmark:

„Pædagogerne kan fortælle, at alt for mange er tvunget til at ansøge om førtidspension eller forlade deres profession. (...) Det, der er nedbrydende for mange, er, at de ikke kan få lov til at tage ansvar. De kan ikke bruge deres uddannelse, og de må droppe såvel deres faglige som deres grundlæggende integritet for at prøve at følge med arbejdet. Det lykkes ikke. Der er ikke ressourcer nok, og de føler sig utilstrækkelige og har en fornemmelse af, at de svigter børnene" (Willig 2009:135[7]).

Í serritgerðini verður komið fram til, at tað hevur stóran týdning at hava fyrireikingartíð til at skipa gerandisdagin og fáa tað námsfrøðiliga sjónarmiðið hugsað við, men um myndugleikarnir herða krøvini eins og í Danmark, áttu fleiri tímar til at útinna hetta arbeiðið at fylgt við, soleiðis at tað ikki eru færri vaksin saman við børnunum. Hetta er við til at avmarka møguleikan fyri góðari námsfrøðiligari dygd. Tað má vera ein javnvág millum nøgdina av fyrireikingararbeiði og hvussu nógv tað sømir seg at vera burtur frá børnunum og starvsfeløgunum, soleiðis at tann námsfrøðiliga dygdin kann blóma á besta hátt.

Ov nógv tíð til fyrireiking, sum ber í sær verri normering á stovuni, kann føra til verri dygd inni á stovuni, eins og eingin fyrireiking og góð normering inni á stovuni við støðugum ófyrireikaðum arbeiði eisini kann bera í sær ringa námsfrøðiliga dygd.

Sum er má tað verða uppgávan hjá námsfrøðingum, leiðslu og kommunu at finna ein javnvág í hesum, við støði í hvørjum einstøkum stovni, tí fleiri fyrireikingartímar krevja fleiri pengar, fyri at stovan ikki skal vera ov nógv tyngd av vánaligari normering og ringari samvitsku hjá námsfrøðingunum, sum fyrireika arbeiðið. Samvitskan hjá tí einstaka námsfrøðinginum og onnur viðurskifti, eitt nú týdningurin av relatiónini ímillum barnið og tann vaksna, tann grundleggjandi týdningurin fyri menniskju at hava ávirkan á sítt egna lív, ST-sáttmálin, foreldrasamstarv og løn eru eisini evni, sum vit hava viðgjørt í serritgerðini, men tey koma vit ikki gjøllari inná í hesari greinini.

[6] *http://www.information.dk/191159*

[7] *Umyndiggørelse 2009, Rasmus Wiilig.*

## Kunning frá

# Aktións- og Upplýsingargrunninum

Á álitisfólkafundinum 29. mai bleiv nevndin fyri Aktións- og upplýsingargrunnin afturvald. Tær, ið sita í nevndini eru: Fríða Lómstein, umboðandi serøkið, Rikke Bak Sørensen, umboðandi dagstovnaøkið, og Elin N. W. Tausen, umboðandi nevndina fyri Føroya Pedagogfelag.

Nevndin fyri A og U grunnin hevur viðgjørt átta umsóknir um stuðul hetta seinasta árið, harav tvær umsóknir eru játtaðar. Onnur umsóknin er „Verkætlan um trivnaðin hjá námsfrøðingum“, ið Susan Hvidbro og Elinborg Lervig hava gjørt í sambandi við, at tær lósu kandidat í pedagogiskari psykologi. Tær hava í hesum sambandi skrivað eina grein aðrastaðni í blaðnum.

Hin umsóknin er stuðul til eina námsferð hjá linjulesandi í sernámsfrøði á Føroya Læraraskúla og teirra áhuga fyri arbeiðsháttinum hjá Marlborough Family Center. Tey høvdu eina grein í seinasta pedagogblaði, og verður ein almenn framløga hjá teimum lesandi mikukvøldið 20. juni kl. 19.30 í Miðlahúsinum, har øll eru vælkomin at lurta og seta spurningar. Ætlanin er at filma framløguna og leggja hana á heimasíðu felagsins, soleiðis at allir limir fáa gleði av henni.

Í verandi løtu hevur nevndin fyri A og U grunnin ikki møguleika at viðgera umsóknir um stuðul, orsaka av fíggjarstøðuni hjá grunninum. Á seinasta aðalfundi bleiv samtykt at heita á nevndina fyri Føroya Pedagogfelag at arbeiða víðari við limagjaldinum og reglugerðini fyri A og U grunnin. Nevndin fyri Føroya Pedagogfelag hevur í hesum sambandi valt at seta nevndina fyri A og U grunnin sum ein arbeiðsbólk, ið skal koma við einum tilmæli til nevndina fyri komandi aðalfund.



# Lívsverk millum fólk ið bera brek

*Trý starvsfólk á Verkstaðnum Vón hava, hvørt á sínum starvsøki, skrivað søgu*

Á Verkstaðnum Vón høvdu trý av starvsfólkunum almenna móttøku í mars. Orsøkin var, at tey eftir drúgva starvstíð, fóru at gevast fyri aldur. Tey trý eru Lena Rasmussen, Grímur Joensen og Hedvig Davidsen, sum øll hava skrivað søgu á sínum starvsøki. Lena, sum hevur virkað á Verkstaðnum Vón frá byrjan av, Grímur, sum hin fyrsti verkstaðarassistenturin í Føroyum, og Hedvig, sum er ein av fyrstu útbúnu pedagogunum, ella umsorganarassistentunum, sum starvsheitið var tá.

## Við frá byrjan

Lena Rasmussen hevur starvast á Verkstaðnum Vón frá byrjan av. Fyrstu árini hildu tey til í Losjuni í Havn, til tey í 1980 fluttu út á Argir, har verkstaðið framvegis heldur til. Tá Lena byrjaði við ársbyrjan 1975, vóru fýra starvsfólk, sum hvørt hevði sína uppgávu, men hóast tað vóru tey at kalla øll um alt. Tá vóru millum 12 og 15 brúkarar.

Í byrjanini var Verkstaðið Vón ein deild undir danska stovninum Rødbygaard, sum søkti eftir fólki til skrivstovuna á Verkstaðnum Vón. Lena, sum eitt tíðarskeið frammanundan hevði arbeitt á Lille Mosegaard, sum var ein stovnur fyri evnaveik, helt lýsingina vera spennandi og søkti og fekk starv í fyrisitingini á nýggja stovninum. Nógv er broytt, síðani Lena hevði sín fyrsta arbeiðsdag á Vón fyri skjótt 38 árum síðani. Bæði bygnaðarliga og í praktiska arbeiðinum. Frá fyrst at vera ein stovnur undir Rødbygaard, varð Verkstaðið Vón lagt undir Behandlingscentret í Næstved, síðani undir Socialstyrelsen, eftir hetta til Almannastovuna, síðani Andveikraverndina, síðani serstovnadeildina og so Nærverkið, og er nú undir Almannaverkinum.

Lena heldur, at ikki allar broytingarnar, sum eru farnar fram hesi árini, hava verið til tað betra.

– Eg haldi, at brúkarin er í dag longri burturi í einum stóri hópi í eini breyt undir Almannaverkinum. Reiðaríið er blivið so stórt, og tí hava vit ikki tað sama sambandið við brúkaran ella tey avvarðandi, sum vit einaferð høvdu. Heimavegleiðararnir vóru millumliðið millum okkum, brúkaran og heimini, og tað helt eg riggaði sera væl, sigur Lena.

Tað vóru eisini stórar broytingar, tá tey fluttu í nýggjan bygning úti á Argjum, har umstøðurnar eru framúr góðar. At byrja við var normeringin 35 brúkarar á verkstaðnum umframt 10 dagsenturpláss, og starvsfólkahópurin er sum vera man øktur samsvarandi. Í 1993 varð Verkhúsið Virkni bygt, og tá fluttu dagsenturbrúkararnir niðan hagar.

– Ikki hevði eg roknað við at vera her í so drúgva tíð, men eg hava trivist sera væl millum góðar brúkarar og starvsfólk, og tí er tað við eitt sindur av sorgblídni, eg nú skal gevast, sigur Lena Rasmussen, skjótt fyrrverandi starvsfólk á Verkstaðnum Vón.

## Fyrsti verkstaðarassistenturin

Grímur Joensen var útbúgvin snikkari, tá ein lýsing sum verkstaðarassistentur á Verkstaðnum Vón fangaði hansara áhuga. Hetta var í sambandi við, at Verkstaðið Vón í 1980 skuldi flyta úr Losjuni og í nýggja bygningin á Argjum. Grímur fekk starvið sum verkstaðarassistentur sum hin fyrsti føroyingur við hesum starvsheiti.

Sum handverkari hevði hann havt nógvar lærlingar, og tað hevur dámað honum væl, og tí tóktist starvið spennandi. Fyrsta tíðin gekk við at fyrireika flytingina út í nýggju hølini á Argjum, har umstøðurnar vóru framúr góðar. Frálík høli og nýggjar maskinur. Tað kundi ikki vera betri. Tá var timburverkstaðurin á Verkstanum Vón normeraður til 20 brúkarar og tveir verkstaðarassistentar. Hóast Grímur hevði starvast sum snikkari í fleiri ár, var hetta rættiliga nógv øðrvísi.

– Fólkini, sum koma at arbeiða á verkstaðnum, høvdu ymiskar bakgrundir og førleikar, og tí ráddi fyrst og fremst um at eygleiða og læra tey at kenna. Arbeiðsuppgávurnar máttu sjálvandi eisini lagast eftir, hvat tey kundu makta. Tað vóru tey, sum vóru betur før fyri at arbeiða sjálvstøðugt, og onnur, og sum høvdu tørv á eitt sindur meira av hjálp og vegleiðing, men tað var eingin trupulleiki. Vit settu okkum í samband við onkrar stovnar, eitt nú Landsverkfrøðingin og Matrikulstovuna, sum lótu okkum ávísar arbeiðuppgávur. Seinri fingu vit eisini uppgávur frá øðrum stovnum og fyritøkum, greiðir Grímur frá.

Í sambandi við arbeiðsuppgávurnar skuldi havast í huga, at tað skuldi ikki vera kappingaravlagandi í kostnaði mótvegis øðrum fyritøkum.

– Vit løgdu eisini sera stóran dent á, at alt virksemi á Vón skuldi líkjast so nógv einum vanligum arbeiðsplássi sum gjørligt.

Fastar arbeiðstíðir, og so skuldi eisini ein meining vera í arbeiðsuppgávunum, soleiðis at brúkararnir her vóru fullgreiðir yvir, at onnur fingu nyttu av tí, sum gjørt varð á Verkstaðnum Vón, sigur Grímur, sum heldur, at vóru fólk líka stundislig at møta á øllum øðrum arbeiðsplássum sum tey á Vón, stóð væl til. Verkstaðið Vón hevur eisini verið væl vitjað av næmingum í starvsvenjing, og tað heldur Grímur tæna bæði endamálinum, at brúkararnir eru saman við øðrum enn teimum, teir vanliga arbeiða saman við, og tað at skapa størri opinleika á hesum, áður meira dulda, økinum.

Fakfelagsliga kann sigast, at Grímur hevur verið ein hin fyrsti limurin í Pedagogfelagnum. Hann var limur í donskum fakfelag, til føroyskir pedagogar stovnaðu sítt egna felag. Ikki vóru nógvir menn í felagnum tá. Hann minnist eina veitslu, har hann var sjálvur annar millum útvið 100 veitslufólk.

– Hetta hevur verið eitt stak gott arbeiðspláss sum eg væl nøgdur hvønn dag eru komin til og frá, sigur Grímur Joensen, sum nú er givin á Verkstaðnum Vón eftir 32 ára starvstíð.




## Fyrr røkt, nú stimbran

Hedvig Davidsen er ein av fyrstu útbúnu føroysku pedagogunum,- umsorganarassistentunum, sum tað tá æt, og hevur starvast sum pedagogur á seymideildini á Verkstaðnum Vón seinastu 16 árini, til hon nú gavst fyri aldur.

Saman við trimum øðrum úr Føroyum fór Hedvig til Danmarkar – á Rødbygaard – at læra til umsorganarassistent. Hetta komst av, at Inga Bonnevie søkti eftir fólki, sum skuldi vera um tey brekaðu í sambandi við, at umstøður gjørdust so, at hesi fólk kundu koma heim aftur til Føroya. Eftir hálvtfjórða ára útbúgving kom hon heimaftur og fór at arbeiða sum assistentur á hvíldarheiminum Nainu. Hedvig giftist og fekk børn og var heima í drúgva tíð, til hon fekk áhuga fyri eini lýsing frá Verkstaðnum Vón, sum søkti eftir fólki til seymideildina.

– Mær hevur altíð dámað at fáast við handaligt arbeiði, og at hetta arbeiðið skuldi vera saman við menningartarnaðum var ikki minni áhugavert. Tað var jú millum hesi fólk, eg hevði fingið mína útbúgving, sigur Hedvig, sum hevur trivist sera væl á sínum arbeiðsplássi á Argjum.

Hedvig ásannar, at Rødbygaard hevur ikki altíð fingið bestu umtaluna, men tað heldur hon vera órættvíst.

– Brúkararnir har høvdu tað gott eftir umstøðunum, sum sjálvandi vóru munandi øðrvísi enn í dag. Tá sluppu tey menningartarnaðu ikki út fyri dyr, sum tey vildu, og skuldu tey út, so var altíð onkur, sum fylgdi við. Í dag er alt hetta tíbetur øðrvísi og betri, nú eisini menningartarnað hava eitt meira verdugt lív. Pedagogiski parturin er munandi øðrvísi í dag, nú farið verður alt meira frá at rokna menningartarnað sum sjúk, ið skulu vera á stovni. Nú ræður um at stimbra tey, og tað hava vit lagt stóran dent á í virkseminum á Verkstaðnum Vón. Hedvig sigur sum Grímur, at eisini á seymideildini løgdu tey stóran dent á at tilvirka lutir, sum onnur kundu brúka og fingu gleði av. Árliga jólasølan er eitt av dømunum um tað.





# Hjálparfólk, upp við høvdinum

*Aftan á aðalfundin hava nógv hjálparfólk ynskt at síggja mítt upplegg, sum kom undir „ymiskt“, so Pedagogblaðið er eitt fínt høvi til tess, so lesið nú kæru limir*

– vit hava okkara ræettindi, og vit eru ikki bara ein ífylla.

### Aðalfundur hjá Pedagogfelagnum 2012

Halló, halló, allir limir í Pedagogfelagnum.

Eg eiti Birthe Didriksen og havi starvast sum hjálparfólk í 25 ár.

Nú arbeiði eg í einum super stovni í Vestmanna sum eitur Látipípan, og eg eri í Frítíðarstovuni.

Grundin til, at eg biði um orðið her, er fyri at vísa á diskriminatiónina, og hvørjar møguleikar vit hjálparfólk hava.

Tað er grundað á skrivið hjá Dagstovninum á Hamrinum til aðalfundin í 2010, har 158 pedagogar hava skrivað undir eitt uppskot, sum hevur til endamáls at fáa hjálparfólkini úr felagnum, tí pedagogarnir ynskja ein reinan fakligan felagsskap.

So spurdi eg meg fyri á Fíggjarmálaráðnum, KAF, Føroya Arbeiðarafelag og Starvsmannafelagnum, um tey kenna slík mál, og fekk upplýst frá teimum, at 90% av portørunum tóku undir við at fara úr Havnar Arbeiðsmannafelag og upp í Starvsmannafelagið, sum so eisini fekk samráðingarrættin.

Tíverri noyddist eg at sita í gjárkvøldi og umskriva mína upprunaligu ætlan um mítt „ynski“, so tit mugu halda mær til góðar.

Eg vil leggja hart út. Ein sovandi bjørn er vaknað úr dvalanum! Eg vil hava ordan í tingunum, so eg havi kunnað Maud, Jórun og Páll um mítt upprunaliga „ynski“, so tey vóru fyrireikað til aðalfundin.

Páll Nielsen advokatur í felagnum, ringdi til mín 2 ferðir í gjár, har hann boðaði frá, at um eg tosaði um tað, sum eg upprunaliga ætlaði á einum aðalfundi, so **kundi** eg verða koyrd úr felagnum, tí tað mótarbeiðir áhugamálum hjá felagnum. Persónliga føli eg hetta sum eina hóttan, tí mítt upplegg kemur undir „ymiskt“, og har verður ikki atkvøtt.

Skrivið hjá Dagstovninum á Hamrinum vísir á, at um mín upprunaliga ætlan mótarbeiðir áhugamálum hjá felagnum, so ger skrivið hjá Dagstovninum á Hamrinum tað eisini. Ella skal eg skilja tað soleiðis, at áhugamál hjá felagnum merkir áhugamál hjá pedagogum og ikki hjá hjálparfólkum.

Kortanei, fari eg at bíða til einaferð, at fleiri pedagogar eru klárir, at nú er tíðin komin, at vit skiljast!

Viðtøkurnar í Pedagogfelagnum eru orðaðar soleiðis, at tað ikki verður arbeitt fyri áhugamálum hjá hjálparfólkum.

Mítt umskrivaða „ynski" er at skapa betri umstøður fyri hjálparfólk í pedagogfelagnum, ella finna aðrar loysnir.

Møguleikin er eisini at verða verandi í felagnum og sjálvi seta dagsskránna og broyta lógir felagsins, eisini tær, ið hava við núverandi diskriminerandi setanartreytir at gera. Tí vit eru hóast alt ein meiriluti í felagnum, og tað er meirilutin, sum ræður, tá atkvøtt verður. Fyri at hetta kann lata seg gera krevst bara, at vit samskipa okkum betur og møta fjølment til næsta aðalfund.

Tað eru uml. 764 pedagogar og 1.076 hjálparfólk í Pedagogfelagnum.

## § 2. Setanartreytir

*Treytin fyri at verða settur í starv er, at viðkomandi hevur lokið námsfrøðiligt prógv, ella samsvarandi prógv, ið er góðkent av Mentamálaráðnum og Føroya Pedagogfelag.*
**Stk. 2.** *Um eingin pedagogur søkir starvið, kann hjálparfólk verða sett fyribils, til pedagogur søkir starvið. Normerað størv, sum ikki eru sett við pedagogum, skulu lýsast leys minst 6. hvønn mánað. Sambært semju millum sáttmálapartarnar kann undantak gerast, so størvini verða lýst leys við eitt ára millumbili.*
(Stovnar ansa eftir, at borðið ikki fangar, tí um hjálparfólk verða uppsøgd triðju ferð, so er tað ikki sakligt meira, og viðkomandi fær fast starv!)

§ 3. Lønir stk. 4. *Ta pedagogisku ábyrgdina skal arbeiðsgevarin geva einum hjálparfólki, tá ið tað normeraða pedagogstarvið er ikki sett. Um pedagogur síðani verður settur í starvið, skal tað hjálparfólkið, ið hevur ta pedagogisku ábyrgdina, ikki sigast úr starvi grundað á, at pedagogur verður settur. Uppsøgnin skal fremjast eftir lógligum uppsagnartreytum.*

So kannaði eg málið um lógir felagsins:
**§ 2. Endamál og virki felagsins.**
**a)** at *virka fyri, **at fólk við pedagogútbúgving verða sett í øll størv,** hvørs uppgáva er at menna børn og ungfólk, eins og tilkomin, sum hava tørv fyri pedagogiskari menning.*

**Dagstovnalógin: § 8. stk. 4.** *Starvsfólkabýtið á dagstovnum skal í minsta lagi verða 2/3 til námsfrøðingatímar og í mesta lagi 1/3 til hjálparfólkatímar. Í serligum førum kann landsstýrismaðurin víkja frá hesum kravi.*

T.v.s. at endamálsorðingin er **at tryggja pedagogar í øll størv!**

Einki eitur normerað sett hjálparfólkastørv í felagnum. Tað er goodwill frá einum leiðara, um so er, at hjálparfólk hava normerað størv.

Felagið diskriminerar hjálparfólkini og favoriserar pedagogarnar.

Tað kann eg slett ikki góðtaka innan sama felag!

Í 1990-1996 var eg álitisfólk hjá hjálparfólkunum í Lítlaskógi.

Lítliskógur og Býlingshúsini vóru limir í Kommunala starvs- og tænastamannafelagnum.

Pedagogfelagið fekk samráðingarrættin um okkum, tí noyddust vit í Pedagogfelagið.

Hetta merkti fyri meg, at eg fór 1.200 kr. niður í løn um mánaðin, misti lívstrygging og tímar, tá vit vóru á fundi um kvøldið!

At tvinga limir niður í løn, og alt annað omaná, gjørdi, at tað gav onga meining at koma upp í Pedagogfelagið!

Síðani tá havi eg ligið í dvala, tí vónin fór við samráðingarrættinum.

Vegna mismun í felagnum, so má eg nevna javnstøðuna, sum vil beina burtur allan mismun.

Serliga kvinnur gera vart við javnbýti og rættindi í samfelagnum millum kyn og krevja líka løn fyri líka arbeiði.

**Tá hugsað verður um, at flestu limir í felagnum eru kvinnur, er tað ikki hóskiligt, at felagið gongur á odda at gera mismun millum limir í sama felag.**

Lat meg enda við endamálsorðingini um lógir felagsins: **At fólk við pedagogútbúgving verða sett í øll størv…**

T.v.s. at so leingi stovnarnir ikki hava nokk av pedagogum, er brúk fyri okkum.

Sum nú er, so koyra flestu stovnar við fleiri hjálparfólkum og færri pedagogum, og børnini trívast væl, og foreldur eru nøgd.

Eingir stovnar eru nakrantíð stongdir øll hesi árini vegna vánaliga góðsku, tí tað eru ov fáir pedagogar.

Misnøgdin er millum pedagogar, og tað haldi eg vera alarmerandi!!!

Um flest foreldur og samfelagið sum heild klagaðu um góðskuna, sooo hevði verið nakað heilt annað, og pípan hevði fingið eitt annað ljóð.

Sum býtið er í dag, so koyra stovnar av tí allarbesta.

So hjálparfólk, upp við høvdinum, vit hava okkara rættindi, og vit eru ikki bara ein ífylla.

Við hesum orðum vil eg finna útav, hvat hjálparfólk siga um støðuna, so latið junglutrummurnar fara í gongd, og so kunnu vit finna eitt dato at møtast!

Um eingin áhugi er, ja gita... so fari eg í dvala aftur :)

Amen

Hetta var so uppleggið, og kann eg leggja afturat, at eg havi tosað við Hildur Patursson um nakrar spurningar, og hon kunnaði meg um, at tá felagið var stovnað í 1982, tá vóru bert pedagogar í felagnum.

Í 1986 ella 1987 komu fyrstu hjálparfólkini í felagið, og tá varð Hildur formaður, og á tí aðalfundinum, bleiv atkvøtt fyri orðingini um, **at fólk við pedagogútbúgving verða sett í øll størv…** t.v.s. § 2. a) í lógir felagsins.

Nú er tað upp til okkum hjálparfólk, hvørji rættindi vit vilja hava!



# Verkgarðurin Spírin

## Eitt frítíðarstað í tí fríu náttúruni

Orð og myndir: Tórfinn Smith

Í og ikki minst uttan um felagshúsini hjá Føroya Ríðingafelag í Havnardali kann av røttum sigast at rættiligt lív er í. Har heldur Verkgarðurin Spírin til. Spírin er eitt rættiliga øðrvísi frítíðartilboð og -stað fyri yngstu skúlabørn í Havn eftir skúlatíð. Rættiliga nógv øðrvísi enn tað, vit vanliga seta í samband við frítíðarskúla. Tað serliga við Spíranum er, at meginparturin av virkseminum gongur fyri seg uttandura, millum børn og djór, við einum samsvarandi pedagogiskum innihaldi. Eitt stað, har børn fáa møguleika til at gera sær nakrar grundleggjandi royndir um lívsins ringrás, sum verkætlanarleiðarin, Bina Svartá, tekur til.

### Byrjaði sum útibarnagarður

Virksemið við børnum í felagshúsunum hjá Føroya Ríðingarfelag í Havnadali byrjaði fyri mongum árum síðani, tá Tórshavnar kommuna leigaði felagshúsini til útibarnagarð, sum var ein partur av barnagarðinum í gamla B36-húsinum. Eftir at útibarnagarðurin hevð í hildið til har í nøkru ár, beyð kommunan frítíðarskúlanum í Hornabø at halda fram. Ann Elisabeth, leiðari á frítíðarskúlanum í Hornabø, sigur, at fyrstu árini fóru tey við nøkrum børnum í senn út í Havnardal, og hetta tóktist at dáma børnunum sera væl. Síðani hevur virksemið í felagshúsunum hjá Ríðingarfelagnum ment seg til eina veruliga verkætlan, sum gevur børnunum eina heilt aðra uppliving, enn vanligi frítíðarskúlin hevur at bjóða.

### Eitt øðrvísi tilboð

Bina Svartá, sum er leiðari fyri verkætlanina í Havnardali, greiðir frá hugskotinum aftan





fyri hetta øðrvísi tilboð til tey yngstu skúlabørnini.

Undir krígnum, í 1943, fingu tey í Danmark eitt hugskot at skipa sonevnd „Skrammellegeplads“ sum eitt tilboð at bjóða býarbørnum. Tað vóru teir pedagogar, sum vildu royna ein øðrvísi pedagogik, sum skuldi venja børn at hugsa sjálv sum ein partur í einum demokratiskum felagsskapi. Virksemið har var fyri ein stóran part at byggja smáttur úr tilfari, sum fólk blakaðu burtur. Hugtakið var at at skapa eitt umhvørvi sum spælipláss, har børnini kundu sleppa at brúka síni kreativu evni við at grava holur og byggja smáttur av tilfari, sum av mongum verður umtalað sum skrambul. Á nútíðarmáli kunnu vit kalla tað endurnýtsla. Hugtakið menti seg síðani til sonevnd „Byggelegeplads“ við fjølbroyttum innihaldi, og seinri gjørdist djórahald ein týðandi partur av innihaldinum, greiðir Bina frá. Hon hevur síðani tikið hugskotið til sín. Sjálv er hon uppvaksin á einum bóndagarði í Saksun og er von við at fáast við djór, og tað hevur henni altíð dámað sera væl. Í sambandi við pedagogútbúgvingina var hon í starvsvenjing á Rødovre Byggelegeplads, og tað eru hugskot haðani, sum hon vildi royna í Føroyum.

– Hetta snýr seg um at geva børnum eitt tilboð, har tey fáa meira at vita um umheimin, tey liva í. Børnini eru við í øllum virkseminum, og tí læra tey nógv av og síggja eina stóra meining í. Djór geva teimum so nógv, og á tann hátt koma børnini eisini í samband við náttúruna. Tey vita, at djórini skulu ansast, tey skulu hava mat hvønn dag, og børnini læra, hvørji eru brúksdjór, og hvørji eru kelidjór. Tey læra og uppliva alla lívsringrásina frá tí, at djórini fáa ungar, hvussu teir skulu ansast, vaksa, mennast og trívast, og børnini góðtaka deyðan, greiðir Bina frá. Starvsfólkini á Spíranum gera eisini nógv við at práta við børnini um tað, sum hendir, og børnini liva fult og heilt við tí, sum fyriferst, og eru sera forvitin og spyrja dúgliga. Tá ið eitt dýr doyr, skipa børnini sjálv fyri jarðarferð, sum fer fram í dunnugarðinum. Bina greiðir frá, at eftir eina tílíka jarðarferð spurdi onkur, um kaninin, tey jarðaðu, mundi fara til himmals, og onkur setti spurnartekin við um nakar visti, hvør pápin mundi vera. Tá lat í einari smágentu: – Vit kunnu bara taka eina dna-roynd...

Saman við foreldrunum geva børnini djórunum um vikuskiftið. Børnini eru fullgreið yvir, at djórini skulu eisini ansast og hava at eta, hóast fólk hava frí, og til tess veksur eisini teirra ábyrgdarkensla mótvegis øðrum.

Í Verkgarðinum Spíranum hava tey dunnur og kaninir, og onkur av starvsfólkunum hava eisini hundin við sær til arbeiðis. Sjálv hava tey ikki ross, men rossafjósini eru næsti granni, og tí eru børnini heldur ikki heilt ókunnug við rossahald.

## Lívsins ringrás

Í sambandi við lívsins ringrás sigur Bina, at „undran“ hjá børnunum er ein púra natúrligur partur av gerandisdegnum í Spíranum.

– Í gerandisdegnum gera vit gera nógv burtur úr hesari natúrligu undranini, sum børnini hava við sær í síni tilgongd til verðina. Í Spíranum eru børnini í einum aldri, har tað fellur teimum lættari enn áður at hugsa abstrakt og filosofiskt. Tað setur nógvar tankar í gongd í einum barnasinni at ferðast í einum so livandi umhvørvi sum í Spíranum, har tú upplivir og knýtir bond til livandi verur frá byrjan til enda, har náttúran loyvir okkum at vera sínir fylgisveinar, men samstundis so sanniliga eisini setur síni heilt greiðu mørk fyri okkum menniskju. Eg haldi tað vera mennandi fyri børnini at uppliva hetta og seta sær sjálvum og vinum sínum allar hesar spurningarnar í sambandi við ymiskar byrjanir og endar. Tað er jú ein heilt natúrligur partur av lívsins ringrás, sigur Bina, sum heldur, at hetta eru lívsroyndir, sum koma teimum til góðar seinni í lívinum. Náttúran er einastandandi, og um vit eru opin og forvitin, so fáa vit nógv. Nútíðarmenniskju hava tørv á at hava eitt tættari tilknýti til náttúruna, og tað fáa børnini í Spíranum.

## Sleppa at royna seg

Í Spíranum leggja tey alstóran dent á at virða frælsið hjá børnunum í Spíranum. Bina sigur, at tað er ofta tað, sum børnini nevna, tá ið tey tosa um, hvat tey elska við Spíranum.

–Eg upplivi, at børn vaksa fleiri metrar, tá ið man gevur teimum tað álitið at loyva teimum at royna seg sjálvi. Vit síggja hvørt ár, at børn mennast í tí stóra rásarúminum, tey fáa. Tað at tey fáa fríar teymar til at uppliva sítt nærumhvørvi og royna seg, og av tí sama læra, hvussu nógv tey eru før fyri, og hvussu sjálvstøðug tey í veruleikanum eru, heldur Bina.

## Stórar ætlanir

Eftir summarfrítíðina fáa eisini børnini í 3. flokki í kommununi møguleika at koma í frítíðarskúla, og Ann Elisabeth sigur seg ikki ivast í, at mong teirra ynskja at koma í Verkgarðin Spíran, sum er eitt eldorado, ikki minst fyri býarbørn, sum hon tekur til. Hon vónar, at kommunan framhaldandi ynskir at hava hetta øðrvísi tilboðið til tey yngstu skúlabørnini. Ann Elisabeth roknar við at hava pláss fyri millum 40 og 50 børnum eftir summarfrítíðina. Tá børn úr 3. flokki koma afturat, er ætlanin at víðka um tilboðini, soleiðis at tey eldru børnini fáa størri ábyrgd og aðrar avbjóðingar. Umstøðurnar í Havnardali eru framúr góðar, og tí vónar Ann Elisabeth, at tað fer at eydnast at útbyggja møguleikarnar við enn fleiri spennandi avbjóðingum.

# Ábyrgdarkensla






Í Spíranum leggja tey vaksnu stóran dent á at hava børnini við í tí dagliga arbeiðinum við djórunum, har tey geva teimum møguleika fyri at taka ábyrgd. Børnini kunnu skriva seg upp til ymiskt virksemi við djórunum í samstarv við ein vaksnan og í hesum syrgja fyri, at djórini fáa at eta og við jøvnum millumbilum reinsa høsnarhús og kaninbúr. Hetta er við til at venja børnini til reglusemi og ábyrgd, samstundis sum tað liggur ein stór gleði í hesum virksemi. Børnini fáa avbjóðingar, ið svara til teirra tørv, soleiðis at vit geva teimum møguleika fyri at eydnast og rúm til at fordjúpa seg. Meðan tey ganga í Spíranum, læra tey so við og við, hvat tað ber í sær at taka sær av einum djóri, og sum tíðin gongur, fáa tey meira áræði og handalag, tí tey vaksa við uppgávuni. Teirra sjálvsvirði og sjálvsálit mennist, og tey blíva meira sjálvstøðug. Tað at børn og vaksin eru felags um ábyrgd og samstarva um hesar uppgávur, sæst aftur á felagsskapinum í Spíranum, sum ber dám av hjálpsemi og samanhaldi.

## Innliving

Innliving fevnir um okkara evni til at fáa samband við onnur, okkara evni at fyrihalda okkum til teirra og skilja teirra kenslur. Tað at børn eru saman við djórum í gerandisdegnum, hevur eina ávirkan á teirra evni til innliving. Í Spíranum læra børnini frá byrjan av, at teirra samspæl við djórini hevur eina ávirkan á, hvussu djórini fyrihalda seg til ein. Um børnini eru ov bráð at nærkast einum djóri, fær tað tær avleiðingar, at djórini fara undan, og tað er tí neyðugt, at tey tulka og avlesa djórini og teirra atferð. Hetta er ein lærdómur, ið børnini taka til sín við tíðini, sum tey læra djóraverðina betur at kenna. Tey vaksnu leggja stóran dent á at hava børn við sær í arbeiðinum við djórum, eisini tá ið djór av eini ella aðrari orsøk hava tørv á eyka umsorgan. Her fylgir tann vaksni forvitninum hjá børnunum, samstundis sum tann vaksni kann seta orð á ta umsorganina og orsøkina til hana, soleiðis at hetta blívur meira nágreiniligt og ítøkiligt fyri børnini, har tey eisini fáa møguleika at hugleiða um hetta virksemið. Tað at arbeiða við djórum sum eitt amboð til at menna evni til innliving, virkar eisini í fluttum týdningi, soleiðis at børnini eisini verða betur før fyri at samskifta, avlesa og rúma hvørjum øðrum.

## Javnvág

Javnvág er eitt hugtak, sum ber ró við sær. At kenna gleði, hvíla í sær sjálvum og kenna seg sum part av eini eind. Tað er nakað, vit hava í huga, tá ið vit arbeiða við djórunum sum pedagogiskt amboð, har vit eisini síggja tað sum eina natúrliga jaliga avleiðing av lyklaorðunum frammanundan. Vit leggja stóran dent á:

- At barnið fær eina kenslu av, hvat endamálið er við at fáast við djórini.
- At barnið skilur mannagongdina og tær reglur, sum fylgja við.
- At tey vaksnu vísa áhuga fyri tí, sum barnið ger.
- At vera við til at tryggja, at avbjóðingin í aktivitetinum samsvarar við teirra førleika.
- At verja barnið fyri óneyðugum órógv.

Tað er her, barnið fær møguleika fyri at verða í eini jaligari støðu, einum virksemi, sum tað sær meining í, og sum er við til, at barnið missir tíðarkenslu, har alt uppmerksemið verður rættað móti sjálvum virkseminum. Javnvág er ein støða, sum spælir ein stóran leiklut í samband við okkara menning, vælveru og trivnað. Tann effektiviseraði og skundigi lívsstílurin, sum samfelagið leggur upp til í dag, krevur, at ein er eyka tilvitaður um, at ein sum vaksin má skapa karmar fyri børnunum at uppliva javnvág. Í Spíranum royna vit at skapa karmar um ein gerandisdag, har børnini kunnu gloyma seg sjálv burtur, sleppa at fordjúpa seg og bara vera.

// Ad: Fróðskaparsetur Føroya
# Ískoytisútbúgving til bachelor og eftirútbúgving fyri lærarar og námsfrøðingar

Lestrarárið 2012 – 2013 skipar Fróðskaparsetur Føroya/Læraraskúlin fyri ískoytis- og eftirútbúgvingarskeiðum fyri lærarum og námsfrøðingum

Skeiðini eru:

- Ískoytisútbúgving til bachelor fyri fólkaskúlalærarar og námsfrøðingar útbúnir eftir eldri lógum
- Linjugreinalestur fyri lærarar og námsfrøðingar

Meira fæst at vita á **setur.fo**

**Vitan er pallurin – forvitni er drívmegin**

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA



# Forskúla-prátið

Eg eri námsfrøðingur og arbeiði í einari skúlastovu, sum er fyri 6 ára gomul børn á Dagstovninum Birkilund.

Áðrenn vit byrjaðu við okkara skúlastovu, keddu tey elstu børnini seg í barnagarðinum, tey fingu ikki aldurssvarandi avbjóðingar, av tí einføldu orsøk, at har vóru so nógv yngri børn, ið starvsfólkini máttu hava í huga, tá tey skipaðu arbeiðið. Tó sluppu tey elstu børnini í bólk at gera ymiskt saman ein til tveir fyrrapartar um vikuna, og tað var so tað.

Tí fóru vit fyri 8 árum síðani undir at seta á stovn eina stovu til tey 6 ára gomlu burturav. Her kundu tey tá, og kunnu tey enn í dag, fáa aldurssvarandi avbjóðingar av øllum slag. Í skúlastovuni fáa vit tikið hædd fyri tí einstaka barninum, vit fáa loftað hugskotunum og initiativinum hjá teimum einstøku børnunum og implementera hesi í okkara gerandisdag. Hetta, at vit hava samband við foreldrini hvønn dag, ger, at vit alt fyri eitt kunnu taka atlit til tað, sum foreldrini hava upp á hjartað viðvíkjandi gongdini á stovuni, trivnaðinum hjá barninum o.s.fr.

Nakað av tí, sum vit hava á skránni, er: dagligar samlingar við sangi, spæli og ymiskum práti, har tey, ið vilja, sleppa til orðana; Stig fyri Stig, svimjing, fimleikarhøll & í skúla einaferð um vikuna; túrar í náttúruna, vitja arbeiðspláss, Skygni 0, uppdagandi skriving, mála, tekna, rørslurúm, rím&ramsur, tónleikur, drama og nógv, nógv annað. Men tað, sum vit leggja størsta dentin á er, at børnini menna sínar sosialu førleikar, at tey gerast meiri sjálvbjargin, og sjálvandi at tey trívast, eru glað og hava tað gott.

Sum eg nevndi, so hava vit eisini nakað av formellari læru. Vit brúka ymiskt tilfar, so sum bókina Skygni 0.

Vit eru námsfrøðingar, ikki lærarar. Lærarar hava lært at hava formella skipaða frálæru, og tað duga teir heilt víst betur enn vit.

Óformel læra er ein av okkara styrkjum. Vit kunnu hjálpa barninum at læra, tá tað er klárt og hevur áhuga. Vit kunnu implementera læruna inn í spælið og áhugamálini hjá tí einstaka barninum.

Politiskt er støða tikin til at seta á stovn forskúlar/0.flokk, í øllum førum í Eysturkommunu, har tey hava gjørt sær nakrar royndir, og í Tórshavnar kommunu.

Mær hevði dámt best, at allir partar vóru við í arbeiðinum at finna fram til, hvør leisturin skal verða fyri hesum børnunum í forskúlaaldri framyvir. Ein partur, ið ikki er nógv at hoyra til, eru vit, ið arbeiða við hesum árganginum á dagstovnaøkinum. Vit hava kanska ikki bjóðað okkum nokk fram, men tað er ikki tí, at vit ikki halda, at okkara arbeiði er týdningarmikið og mennandi fyri børnini. Okkara royndir vísa okkum, at okkara arbeiðsháttur riggar og ger mun, og vit meta, at hetta er vegurin fram.

Ein møguleiki kundi til dømis verðið, at øll 6 ára gomul børn komu á ein stovn sum okkara og gingu í skúlastovu. Ein lærari kundi havt tilknýti til hvønn einstakan stovn, og komið har at undirvíst í einar tveir skúlatímar um dagin. So høvdu vit á stovninum sæð, hvat børnini lærdu og kundu ment teir førleikarnar hjá børnunum undir meiri óformellum umstøðum á stovninum, m.a. við at skapa karmar, ið birta upp undir eitt ávíst slag av spæli ella aktiviteti. Av tí, at vit hava børnini allan dagin, hava vit betri møguleikar enn ein lærari at taka atlit til hvørt einstakt barn. Vit hava betri møguleika at møta barninum, har tað er, og hjálpa tí út frá tí stigi, tað er á, og út frá tí, sum tað vísir áhuga fyri júst nú.

Nakað av tí, eg sum námsfrøðingur stúri fyri viðvíkjandi einum forskúla, er, at eftir skúlatíð skulu børnini í frítíðarskúla. Nógvir námsfrøðingar og hjálparfólk í frítíðarskúlum gera eitt gott arbeiði, tað er ikki tað, sum er galið. Tað eru heldur umstøðurnar og tíðin til tað einstaka barnið. Normeringin av starvsfólkum til frítíðarskúlan er væl minni enn til barnagarðin, har eru nógv og størri børn, nú heilt upp í 3. flokk, og eg meti ikki, at tú kanst stimbra tey 6 ára gomlu børnini á ein nøktandi hátt og geva teimum ta umsorgan, tey hava brúk fyri, undir teimum fyritreytum, ið eru galdandi í einum frítíðarskúla, sum nú er.

Útbúgvingarnar til lærara og til námsfrøðing verða báðar tiknar á Fróðskaparsetri Føroya. Lærarалesandi og námsfrøðilesandi hava fleiri felagslærarar, taka ymsar lærugreinar saman og enda eftir 4 árum við einari útbúgving á Bachelor-stigi.

Fyri at fáa fulla nyttu burtur úr báðum útbúgvingunum er tað umráðandi, at tað verður eitt javnmett samstarv um arbeiðið við børnunum. Eitt starv sum hjálparlærari er ikki eitt javnmett samstarv í mínari verð.

Vit ynskja øll tað besta fyri børnini. Foreldur, lærarar og námsfrøðingar. Fyri at framtíðin hjá børnunum skal verða so góð sum gjørligt, er tað neyðugt við góðum og konstruktivum samstarvið millum okkum øll. At skunda ein forskúla ígjøgnum politiskt, uttan at allur viðkomandi fakligur kunnleiki verður ein partur av fyrireikingunum, meti eg *ikki* vera tað besta fyri børnini.

Allan Mortensen, námsfrøðingur í skúlastovuni Løkin á Dagstovninum Birkilund.



# Leiðarar ynskja annan bygnað

Málið, sum fekk mestu umrøðuna á leiðararáðsfundinum 9. mai, var bygnaðarliga støðan, leiðarar hava í Pedagogfelagnum. Spurningur varð settur, um Pedagogfelagið við verandi bygnaði er ført fyri at røkja áhugamálini hjá teimum ymisku starvsbólkunum nóg væl.

Endamálið hjá leiðararáðnum er at lýsa støðuna og møguliga tørvin hjá stovnum og leiðarum mótvegis nevndini og at koma við uppskotum um, hvussu nevndin og leiðarar í felag kunnu lyfta økið, bæði fakliga og fyrisitingarliga.

Poula Eidesgaard, limur í leiðararáðnum, sigur, at orðaskiftið á fundinum kundi bent á, at leiðarar ynskja størri heimildir til leiðararáðið, enn tað hevur í dag. Ein sonevndur „paraplybygnaður" hevði ikki verið óhugsandi, og júst hendan spurning eru tey í leiðararáðnum sinnað at tosa nærri um á einum fundi, sum verður í næstum.

Leiðararáðið hevur annars fýra árligar fundir saman við nevndini í Pedagogfelagnum, har kunnað verður um ymiskar yvirskipaðar spurningar. Umframt tað skipar leiðararáðið fyri árliga leiðaradegnum, sum í ár verður 12. oktober. Tá er eisini vanligt at hava onkran fyrilestur ella skeið. Á leiðaradegnum í ár fer Steen Hildebrandt, ph.d, sum er professari í organisatións- og leiðsluteori á instituttinum fyri marketing og organisatión við lærda háskúlan í Århus, at halda fyrilestur.

**Fyrireiking uttan pengar**

Av øðrum málum, sum fingu umrøðu á fundinum, var spurningurin um fyrireikingartíðina. Poula Ejdesgaard sigur, at tað hevur skapt mikið høvuðbrýggj millum leiðarar á dagstovnaøkinum, at eingir pengar fylgdu við orðingini í nýggja sáttmálanum í sambandi við fyrireikingartíðina. Sama ger seg eisini galdandi á serstovnaøkinum, har líknandi orðing um fyrireikingartíð als ikki kom við í tann nýggja sáttmálan.

Á fundinum bar Marjun Hentze seg undan afturvali. Í hennara stað varð Hildur Hermansen vald.


Netbankin sum app

Avgreið tey flestu bankaviðurskiftini tá tað passar tær

Við Netbanka sum app kanst tú m.a.

- síggja salduyvirlit
- síggja IBAN nummar
- gera flytingar
- gjalda rokningar
- rokna gjaldoyra
- fáa samband við bankan



SUÐUROYAR SPARIKASSI

lív.fo

# Fá eitt ríkt lív

Lív hjálpir tær at fáa tað fíggjarliga í trygga legu



## Persónlig eftirløn

Lívið lagar seg ymiskt fyri okkum øll. Tí hava vit eisini tørv á ymiskum eftirlønum. Sum Føroya størsta og royndasta eftirlønarfelag, veitir Lív tær eina persónliga eftirløn. Vit hjálpa tær at laga tína eftirløn til tað lív, tú vilt liva og til ta framtíð, tú hevur útlit til.

Kom inn á **liv.fo** og fá innlit í, hvør eftirløn hóskar best til tín.

Innlit í útlit

ekko 239 239